# Løgmansskrivstovan

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30.05.2016 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | GMN/Lógartænastan |

**Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven

(Kynslig brotsverk)

### § 1

Í lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:
**"(Revsilógin)"**

**2.** Í § 93, stk. 3 verður "§§ 224 og 225" broytt til: "§ 225".

**3.** § 94, stk. 4 verður orðað soleiðis: "*stk. 4.* Fyri brot á §§ 210 og 216-224, § 225, sbr. §§ 216-224, § 226, § 227, stk. 1, § 245 a, § 246, sbr. § 245 a, § 260, stk. 2, og § 262 a, stk. 2, móti einum persóni undir 18 ár, ella á § 232 móti einum barni undir 15 ár, verður fyrningarfreistin tó í fyrsta lagi roknað frá tí degi, at tann órættaði fyllir 21 ár. Sama er galdandi fyri brot á §§ 244, 245 og 246, tá ið talan er um fosturtøku, fosturfækkan ella sterilisering móti einum persóni undir 18 ár uttan samtykki, um hetta ikki er heimilað í lóg. Um gerningsmaðurin við harðskapi, ólógligum tvingsli sambært § 260 ella við aðrari revsiverdari gerð hevur tvingað tann órættaða til ikki at melda lógarbrotið til løgregluna, verður fyrningarfreistin tó í fyrsta lagi roknað frá tí løtu, at tvingsilin er hildin uppat."

**4.** § 210 verður orðað soleiðis:
"**§ 210.** Tann, sum hevur samlegu við skyldfólk í fallandi legg, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. Ættleiðing verður javnsett við lívfrøðiligan skyldskap
*Stk. 2.* Tann, sum hevur samlegu við bróðir sín ella systir sína, verður

revsaður við fongsli í upp til 2 ár. Revsingin kann detta burtur hjá tí, sum er undir 18 ár.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 galda eisini fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu."

**5.** Kapittul 24 verður orðað soleiðis:

"**Kapittul 24**
**Kynslig brotsverk**

*Neyðtøka*
**§ 216.** Fyri neyðtøku verður tann revsaður við fongsli í upp til 8 ár, sum:
1) noyðir annan til samlegu við harðskapi ella hóttan um harðskap, ella
2) skaffar sær samlegu við at nýta annan ólógligan tvingsil, sbrt. § 260, ella skaffar sær samlegu, har tann órættaði er í slíkum tilstandi ella slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini.

*Stk. 2.* Fyri neyðtøku verður tann revsaður við fongsli í upp til 12 ár, sum hevur samlegu við barn undir 12 ár.
*Stk. 3.* Revsingin eftir stk. 1 kann vaksa upp í 12 ár, um neyðtøkan hevur verið serliga vandamikil, ella umstøðurnar aðramáta eru serliga skerpandi.
*Stk. 4.* Tá ið revsingin verður ásett, skulu umstøðurnar vanliga roknast sum skerpandi, um tann órættaði hevur verið fyri menniskjahandli.

**§ 217.** (Strikað)

*Misnýtsla o.a.*
**§ 218.** Tann, sum við at misnýta annans sálarsjúku ella sálarliga menningartarn skaffar sær samlegu við viðkomandi, verður revsaður við fongsli í upp til 4 ár.

**§ 219.** Við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum:
1) starvast hjá brotsmálaumsorganini og hevur samlegu við persón, sum hevur tilhald í einum av stovnunum hjá brotsmálaumsorganini og undir myndugleika hjá viðkomandi,
2) starvast hjá løgregluni og hevur samlegu við persón, sum er frælsisskerdur og í varðhaldi hjá løgregluni, ella
3) starvast á ella hevur eftirlit við samdøgursstovni ella tilhaldi hjá børnum og ungum, psykiatriskari deild, samdøgursstovni fyri persónar við ringum sálarbreki ella tilíkum stovni, og sum hevur samlegu við ein, sum er skrivaður inn á viðkomandi stovn.

**§ 220.** Tann, sum við grovari misnýtslu av annans arbeiðsliga, fíggjarliga, viðgerðarliga ella røktarliga tørvi skaffar sær samlegu við viðkomandi, verður revsaður við fongsli í upp til 1 ár. Er tann órættaði undir 18 ár, er revsingin upp í 4 ár.

**§ 221.** Við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum sníkir seg til samlegu við persón, sum tekur gerningsmannin fyri at vera ein annan.

*Kynslig misnýtsla av børnum*
**§ 222.** Tann, sum hevur samlegu við barn undir 15 ár, verður dømdur í fongsul í upp til 8 ár, um ikki talan er um brot á § 216, stk. 2. Tá ið revsingin verður ásett, skulu umstøðurnar roknast sum skerpandi, um gerningsmaðurin hevur skaffað sær samlegu við at gera sær dælt av síni kropsligu ella sálarligu yvirvág.
*Stk. 2.* Hevur gerningsmaðurin skaffað sær samlegu við tvingsli ella við hóttanum, kann revsingin vaksa upp í 12 ár.

**§ 223.** Við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum hevur samlegu við persón undir 18 ár, og tann órættaði er stjúkbarn ella fosturbarn hjá viðkomandi, ella er litin honum upp í hendur til undirvísingar ella uppalingar.

*Stk. 2.* Sama revsing er fyri tann, sum grovliga misnýtir sína yvirvág í aldri ella royndum til at forføra ein persón undir 18 ár til samlegu.

**§ 223 a.** (Strikað)

**§ 224.** Tann, sum medvirkar til, at persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.
*Stk. 2.* Tann, ið sum kundi fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við persón undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

**§ 225.** Ásetingarnar í §§ 216-224 galda eisini fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.

**§ 226.** Tann, sum tekur pornografiskar myndir, filmar ella tilíkt av persóni undir 18 ár við tilætlan at selja ella aðramáta breiða út tilfarið, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.

**§ 227.** Tann, sum medvirkar til, at persónur undir 18 ár er við í pornografiskari framførslu, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.
*Stk. 2.* Tann, ið sum áskoðari er til framførslu, nevnd í stk. 1, har persónur undir 18 ár er við, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

**§ 228.** Brot á § 216, stk. 1, nr. 2, §§ 218 ella 222-224, § 225, sbr. § 216, stk. 1, nr. 2, §§ 218 ella 222-224, § 226 ella § 227, stk. 1, fáa lutvíst linari revsing, um gerningsmaðurin av ókunnleika um tilstandin ella aldurin hjá tí órættaða ikki kann sigast at hava handlað tilætlað, men tó í ósketni.

**§ 229-231.** (Strikað)

*Blúnisbrot*

**§ 232.** Tann, sum fremur blúnisbrot, verður revsaður við bót ella fongsli í upp til 2 ár. Er tann órættaði undir 15 ár, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 ár.

*Prostitutión o.a.*

**§ 233.** Tann, sum rekur vinnu, við at annar fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda, fremur ruffarí og verður revsaður við fongsli í upp til 4 ár.
*Stk. 2.* Tann, sum aðramáta ger sær dælt av, at onkur við vinnuligum endamáli hevur kynsligt samband við kunda fyri gjald ella lyfti um gjald, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 3 ár. Sama er galdandi fyri tann, ið sum millummaður í fleiri endurtakandi førum ella við vinningi fyri eyga fremur, at annar fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda.
*Stk. 3.* Tann, sum leigar út rúm á gistingarhúsi, soleiðis at annar við vinnuligum endamáli har kann hava kynsligt samband við kunda fyri gjald ella lyfti um gjald, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.

**§ 234.** Tann, sum við ólógliga at skapa, styrkja ella gera sær dælt av villleiðing ella á annan ósømiligan hátt fær annan persón til fyri gjald ella lyfti um gjald at hava kynsligt samband við kunda, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

**§ 235.** Við sekt verður tann revsaður, sum:

1) selur ella letur ónærisligar myndir, filmar ella lutir til persón, sum er undir 18 ár, ella
2) almannakunngerð ella breiðir út ella við tilíka ætlan ger ella flytur inn pornografiskar myndir, filmar ella lutir.
3) fyriskipar pornografiskar framførslur

*Barnapornografi*

**§ 236.** Tann, sum breiðir út pornografiskar myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við bót ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru av øllum at rokna umstøður, har vandi er fyri lívinum hjá barninum, har ið grovur harðskapur verður nýttur, har barnið fær álvarsaman skaða, ella umstøður, har ið talan er um regluliga ella skipaða útbreiðslu.

*Stk. 2.* Tann, sum eigur ella keypir ella gjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar útvegar sær atgongd til myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.

*Stk. 3.* Ásetingin stk. 2 er ikki galdandi fyri myndir, filmar ella tílíkt av persónum, sum eru fyltir 15 ár, og sum hava givið sítt samtykki til, at ein kann hava tilfarið í hondum.

*Dóm við treytum*

**§ 237.** Tá ið dømt verður eftir §§ 216 ella 222, § 223, stk. 2, § 224, stk. 1, § 225, sbrt. §§ 216 ella 222, § 223, stk. 2, ella § 224, stk. 1, § 228, sbrt. við eina av áðurnevndu ásetingum, § 232 ella § 262 a, stk. 2, kann tann dømdi saman við dóminum fáa forboð fyri:

1) at vera ella ferðast á einum neyvari ásettum øki við gerningsstaðið, tilhaldsforboð,
2) uttan við loyvi frá løgregluni at lata børn undir 18 ár halda til á bústaði sínum ella sjálvur at halda til hjá persónum, har sum børn undir 18 ár búgva, bústaðarforboð,
3) at fáa vitjan av børnum undir 18 ár, tá ið ein vaksin ikki er við, vitjanarforboð, ella
4) gjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar at royna at fáa kontakt við børn undir 18 ár, tá ið tey ikki kenna tann dømda, kontaktforboð.

*Stk. 2.* Forboð eftir stk. 1 fevnir ikki um kontakt, tilhald ella ferðing, sum tann dømdi av serligum orsøkum má metast at hava rætt til. Forboð eftir stk. 1, nr. 2 og 3, fevnir ikki um børn ella ættleidd børn hjá viðkomandi.

*Stk. 3.* Forboð kann verða givið, tá ið tað eftir slagnum á lógarbrotinum og eftir upplýsingum um tann dømda, herímillum um áður framdan kriminalitet, má metast at vera nærliggjandi vandi fyri, at tann dømdi annars fer at gera líknandi lógarbrot, og forboðið kann vera við til at fyribyrgja hesum vanda.

*Stk. 4.* Forboð verður sett at galda í 1 til 5 ár, frá tí at endaligur dómur er sagdur, ella tað verður sett at galda í óásetta tíð.

*Stk. 5.* Forboð má ikki vera í ósamsvari við tað ólag, sum tað skapar hjá tí dømda, við fyrilitið fyri teimum, sum tað skal verja, ella við slagið á lógarbrotinum.

*Stk. 6.* Tá ið forboð er sett at galda í óásetta tíð, kann tann dømdi 5 ár eftir dómin krevja, at ákærumyndugleikin biður rættin taka støðu til, um forboðið skal standa við. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann løgmálaráðharrin loyva, at málið verður lagt fyri rættin áðrenn hetta. § 59, stk. 2, er samsvarandi galdandi. Avgerðin verður tikin við úrskurði. Verður avgjørt, at forboðið heilt ella lutvíst skal standa við, kann tað leggjast fyri rættin av nýggjum, tó ikki fyrr enn 2 ár eru gingin.

*Stk. 7.* Brot á forboð eftir stk. 1 verður revsað við fongsli í upp til 4 mánaðir.

**6.** § 265 verður strika.

**7.** I § 275, stk. 2 verður ”§§ 263-265” broytt til: “§§ 263 og 264”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### Orsøkir til uppskotið

Ásetingarnar í revsilógini viðvíkjandi kynslig brotsverk hava sum høvuðsendamál at verja kynsliga frælsi og sjálvsavgerðarrætturin hjá tí einstaka. Tí er týdningarmikið, at ásetingarnar eru tíðarhóskandi og samsvara við nútíðar samfelagið.

Seinastu árini hevur verið funnist at, at ásetingarnar viðvíkjandi kynslig brotsverk í revsilógini ikki eru dagførdar síðan øki kom á føroyskar hendur í 2009. Serliga hevur verið víst á, at neyðugt er, at dagføra ásetingarnar viðvíkjandi neyðtøku, misnýtslu av hjálparleysa støðu hjá órættaða og kynsligt  samband við ættleitt børn.

Tað hevur verið víst á, at tað er óheppið, at revsingin fyri ein persón sum misnýtir óhjálpna støðuna hjá einum persóni til at hava samlegu, er nógv styttri enn fyri neyðtøku. Somuleiðis er tað stoytandi og ógvuliga óhóskandi í nútíðarsamfelagið, at nøkur kynslig brotsverk ikki vera revsaði, um tey vera framd innan hjúnalagið ella at revsingin kann detta burtur, um man seinni gongur í hjúnalag.

Eisini í samband við arbeiði við Heildarætlanin viðvíkjandi harðskap í parlagi og nærsambongum og Heildarætlan um kynsligan ágang hevur fleiri ferðir verið víst á, at føroyska revsilógin tørvar dagføringar.

Endamálið við lógaruppskotið er tískil at dagføra revsilógina so hon verður meira tíðarhóskandi. Samstundis verður farið undir stóra arbeiði at føroyska revsilógina.

### Galdandi lóggáva

Kapittul 24 í Revsilógini um "kynslig brotsverk" fevnir um ásetingar um kynslig sambond sum eru komin í lag við tvingsli, misnýtslu ella annað, ásetingar um kynslig misnýtsla av børnum, ruffarí, blúnisbrot, pornografi og barnapornografi. Tað vil siga, at talan er um sera ymiskar ásetingar viðvíkjandi kynslig brotsverk.

*Neyðtøka og aðra kynsliga misnýtslu*

Kapittul 24 er soleiðis skipa, at ásetingarnar viðvíkjandi neyðtøku ella aðra kynsliga misnýtslu eru í §§ 216-221. Hesar ásetingar eru treytaðar av eitt krav um tvingsil ella misnýtslu, tað vil siga, at kynsliga sambandi er komið í lag á ein tílíkan hátt ella undir tílíkar umstøður at órættaði ikki hevur givið eitt haldgott samtykki.
Hesar ásetingar umfata kynslig brot har harðskapur, tvingsil og hóttanir hava verið nýttar umframt kynslig brot har ein serlig ella veik støða hjá órættaði verður misnýtt.

Tá tosa verður um samlegu í kap. 24, verður sum heild meint við vaginala samlegu millum mann og kvinnu.
Annað kynsligt samband enn samlega verður regulera í § 224, meðan kynsligt samband millum tvey av sama kyni, verður regulera í § 225.

Tað skal vera orsakasamband millum harðskapsgerðin og samlegan, tað vil siga, at sjálv samlegan skal vera gjøgnumført móti viljan hjá órættaði.
Tað skal vera tilætlan til øll lið í brotsgerðarevni í § 216. Av serligum týdningi í hesum samanhangið er, at um brotsmaðurin ikki hevur skilt, at mótstøðan hjá órættaði er meint í álvara, so manglar tilætlan.

§ 216, stk. 2 verður einans nýtt har “neyðtøkan hevur verið serliga vandamikil ella umstøðurnar aðramáta eru serliga skerpandi”. Hetta byggir tó altíð á eina ítøkiliga meting.
At fleiri viðurskifti skulu dømast samstundis ella at gerningsmaðurin áður hevur gjørt samsvarandi brotsverk, er ikki í sjálvum sær nokk til, at skerpandi umstøður eru til staðar.
Málið má metast sum heild, fyri at vita um grundarlag er fyri at nýta skerpaði revsiramman.
Um gerningsmaðurin hevur nýtt knív ella serliga vandamikið tak um hálsin, hevur neyðtøkan ofta “verið serliga vandamikil”.
Ásetingin í § 217, revsar tann sum skaffar sær samlegu við at nýta annan ólógligan tvingsil. Hendan ásetingin má síggjast í samanhang við § 216, tí júst sum § 216 brotsliggerð § 217 tað at skaffa sær samlegu við tvingsil. Tvingsilsráðini eru tó minni álvarsom, enn tey sum eru fevnd av § 216 og revsiramman er tí eisini linari enn í § 216.

Sambært § 224 vera ásetingarnar í §§ 216-223a samsvarandi nýtt í samband við annað kynsligt samband enn samlegu millum mann og kvinnu og sambært § 225 vera ásetingarnar í §§ 216-220 og §§ 222-223a samsvarandi nýtt í samband við kynsligt samband millum tvey av sama kyn.
§ 224 og § 225 víðka sostatt ásetingarnar til eisini at fevna um aðrar kynsligar gerðir enn samlega.

Knýtt at §§ 216-226 er í § 227 ein áseting um møguleika fyri revsilækking ella revsiburturfall um partarnar seinni giftast.

*Kynslig misnýtsla av børnum*
Ásetingarnar viðvíkjandi kynslig misnýtsla av børnum eru at finna í §§ 222, 223 og 223 a. Hesar ásetingar innihalda eitt treytaleyst forboð ímóti samlega og annað kynsligt samband við børn undir 15 ár og við persónar undir 18 ár, sum hava eitt serligt samband við brotsmanninum. Hesar ásetingar eru galdandi, óansæð um ítøkilig misnýstsla er farin fram.
Afturat hesum eru ásetingar, har krav er um grov misnýtsla av yvirvág í aldri ella royndum í samband við at ein persón undir 18 ár verður forførd til samlegu, og ásetingar um revsing fyri tann, ið sum kunda móti gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við persón undir 18 ár.

*Ruffarí o.a.*
Ásetingarnar viðvíkjandi ruffarí og annað bakmansvirksemi í samband við prostitutión eru at finna í §§ 228 og 229. Afturat hesum knýtir seg ein revsiherðingarregla í § 231. Í § 233 er ein áseting, sum viðvíkur tann sum eggjar ella innbjóðar til leysalevna ella sýnir ein slíkan ósiðiligan livihátt at hetta kann vera til ampa ella skapa alment forargilsi.

*Blúnisbrot*
Ásetingin viðvíkjandi blúnisbrot er at finna í § 232

*Dóm við treytum*
Sambært § 236 kann ein persónur sum verður dømdur fyri summi kynslig brotsverk áleggjast ymiskar treytir. Hesar treytir kunnu vera treytir um:
1) ikki at uppihalda seg ymisk støð
2) um ikki at lata børn undir 18 ár uppihalda seg í heiminum hjá persóninum uttan loyvi frá løgregluni ella
3) ikki at uppihalda seg hjá persónum, har tað eru børn undir 18 ár.

*Brotsverk innan familjuna*

Eisini aðrastaðni enn í kapittul 24 finnast ásetingar, sum kunnu hava týdning í samband við kynslig brotsverk. Her kann serliga nevnast § 210, sum viðvíkur samlegu og aðrar kynsligar gerðir við lívfrøðilig børn ella systkin. § 210 inniheldur eitt fullkomilig forboð ímót kynsligt samband millum skyldfólk í fallandi legg og millum systkin ella hálvsystkin.

*Fyrning*

Sambært verandi lóggáva byrja brot á §§ 216-220 (tað er neyðtøka, samlega við annan ólógligan tvingsil, misnýtsla av annans sálarsjúka o.a., misnýtsla av ymisk størv og grov misnýtsla av annans arbeiðsliga og fíggjarliga tørvi ) og brot á §§ 222 og § 223 (tað er samlega við barn undir 15 ár og samlega við ættleitt barn, stjúkbarn og fosturbarn, sum er millum 15 og 18 ár) fyrst at fyrnast tá órættaði er fylt 18 ár.

**Endamálið við uppskotinum**

Uppskotið miðar ímóti at dagføra og nútímansgera ásetingarnar um kynslig brotsverk í kapittul 24 í revsilógina. Roynt hevur í stóran mun, at gingið atfinningarnar sum hava verið ímóti hesar ásetingar síðstu árini á møti. Samstundis er eisini roynt at skipa ásetingarnar um kynslig brotsverk greiðari.

Nú kapittul 24 um kynslig brotsverk verður dagført, er teksturin eisini umsett til føroyskt.

Hetta er fyrstu ferð síðan revsilóggávan kom á føroyskar hendur, at partar av revsilógini nú vera umsett til føroyskt. Í hesum sambandi er roynt at nýta eitt mál, sum er lætt at lesa hjá vanliga borgaranum, og sum skal geva eina kenslu av, at man tosar í eygnahædd. Samstundis hevur verið ógvuliga týðandi, at varðveita tað presisa innihaldið í ásetingarnar.

Tað hevur verið týdningarmikið, at varpa ljós á, at kapittuli snýr seg um rættin til kynsligan sjálvsavgerðarrætt og frælsi og ikki um brot móti siðalæran. Kapittulin hevur tí fingið heitið: “Kynslig brotsverk” í staðin fyri heitið: “Siðamisbrot”.

Hugsað hevur eisini verið um, ikki at nýta niðrandi hugtøk og um í størst møguligan mun ikki at nýta hugtøk sum knýta seg til annað kynið. Hetta hevur millum annað ført við sær, at orðið “ruffarí” hevur verið nýtt, í staðin fyri “skøkjuhald” ella “skøkjuvinna”, sum beinleiðis knýtir seg til kvinnuligan prostitutión, og sær burtur frá at tað eisini finnast mannligir prostitueraði. Hetta hevur sjálvandi verið vent við málfrøðingar fyrst.

Av onnur málslig val, kann nevnast, at valt er at nýta orði “sekt” í staðin fyri “bót”, sum nokk hevur verið tað mest vanliga seinastu nógvu árini. Orsøkin til hetta er tann, at “sekt” er tað gamla føroyska orði fyri “bót”, og merkir júst tað sama. “Bót” hinvegin merkir á gomlum føroyskum, nakað man setur á buksurnar, tá hol er komi á.

**Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Lógaruppskotið miðar ímóti at skipa kapittul 24 greiðari, samstundis sum málið, so vítt til ber, skal vera lætt at lesa og í eygnahædd við borgarin. Hetta má tó ikki ávirka neyvleikan í ásetingarnar.

Kapittulin verður dagførd og nútímansgjørd, so hann er meira í trá við nútíðar samfelagið.

Roynt hevur verið í størst møguligan mun, at ganga tær atfinningar, sum hava verið ímóti kapittulin á møti. Samstundis eru fleiri ásetingar gjørdar einklari og greiðari.

Broytingarnar í kapittul 24, kynslig brotsverk, bera í høvuðsheitum í sær at:

1) Kapittulin fær heitið “kynslig brotsverk”
2) Reglurnar um neyðtøku í § 216 vera víðkaðar til eisini at fevna um tað at skaffa sær samlegu við at nýta annan ólógligan tvang og ella skaffar sær samlegu, har tann órættaði er í slíkum tilstandi at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp imóti gerðini. Hesar ásetingar eru fluttar úr §§ 217 og § 218, stk. 2. Broytingin ber í sær, at hesar støður nú vera metar sum beinleiðis neyðtøka og at vanliga revsiramman fer úr fongsul í upp til 4 ár til fongsul í upp til 8 ár. Broytingini ber eisini í sær, at brot innan hjúnalagið eisini vera fevnd av ásetingini.
3) Reglurnar um neyðtøku í § 216 vera eisini víðkaðar til at fevna um, at skaffa sær samlegu, har tann órættaði er í slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp í móti gerðini. Hetta er ein nýggja áseting, sum áður mátti metast eftir reglurnar um blúnisbrot.
4) Samlega við barn undir 12 ár verður flutt úr § 222 til § 216 og verur framyvir altíð rokna sum neyðtøku. Revsiramman, sum longu er 12 ár verður ikki broytt.
5) Ásetingin í § 218 viðvíkjandi misnýtsla av annans sálarsjúku ella sálarliga menningartarn fyri at skaffa sær samlegu og ásetingin í § 220 viðvíkjandi grovari misnýtslu av annans arbeiðsliga, fíggjarliga, viðgerðarliga ella røktarliga tørvi fyri at skaffa sær samlegu verða broytt til eisini at fevna um brot innan hjúnalagið.
6) Verandi § 224 viðvíkjandi annað kynsligt samband enn samlega og verandi § 225 viðvíkjandi kynsligt samband við ein persón av sama kyni, vera løgd saman í eina áseting í § 225, sum viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlega, sum eru aðrar gerðir enn samlega óansæð um tað er við hitt kyni ella sama kyni. Samstundis verður anal samlega sum nakað nýtt, partur av vanliga samlegu hugtakið.
7) Í § 224 verður sett ein nýggj áseting viðvíkjandi medvirkan til, at ein persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda.
8) Verandi § 230, 1. pkt. verður flutt til § 226, samstundis sum greinin verður orða greiðari og revsiramman verður herð.
9) Verandi § 227, viðvíkjandi revsilækking ella revsiburturfall fyri brot á §§ 216-226 um gerningsmaðurin og órættaði gifta seg, dettur burtur. Samstundis verður ein nýggja áseting viðvíkjandi medvirkan til, at persónur undir 18 ár er við í pornografiska framførslu og tann sum er áskoðari til slíka framførslu, verður sett inn sum nýggj § 217.
10) Orðingin av § 232, verður gjørd einklari, men ætlanin er ikki at gera nakra broyting í brotsgerðsinnihaldi.
11) Í § 233 verður sett inn áseting um ruffarí. Ásetingin kemur úr verandi § 228, stk. 1, nr. 3 og úr § 229, stk. 1 og 2. § 229, stk. 3, 4 og 5 viðvíkjandi at ein maður letur seg uppihalda av einari prostitueraða kvinnu ella býr saman við henni, verður strika, tí ásetingarnar vera ikki metar at vera í trá við nútíðar hugsan og verjiatlitini vera førd víðari í § 233. Galdandi § 233 viðvíkjandi eggjan og innbjóðing til prostitutión og annað verður strika.
12) Galdandi § 234, viðvíðkjandi ónærisligar skriftir, myndir, lutir og annað verður flutt til § 235, og í staðin verður § 228, stk. 1, 1 viðvíkjandi tann sum lokkar nakran til prostitutión, sett inn í § 234, tó við nýggjari, greiðari og meira nútímans orðing.
13) Galdandi § 234 verður flutt til § 235, tó við onkrum broytingum, og við meira nútímans orðingum. Ætlanin er ikki at geva pornografi leyst, men at lagað ásetingarnar til nútímans samfelagið. Nágreina verður at talan skal vera um pornografiskt tilfar. Banna verður at selja myndir, filmar og lutir til persónar undir 18 ár. Skriftirnar verða tiknar út, bæði tí tað ógvuliga lætt at fáa fatur á tílíkar skriftir á alnótini, men eisini tí at tílíkt tilfar er blivi meira alment viðurkent og er at fáa í vanligum bókhandlum.Almennar

fyrilestrar og framsýning eru eisini tiknar út, meðan tað er nágreina at pornografiskar framførslur eru bannaðar.

14) Undantakið frá forboðið móti at eiga ella keypa myndir, filmar ella tílíkt av persónum undir 18 ár verður nágreina og staðfest verður at undantikið bert er galdandi, so leingi persónurin, sum er fylt 15 ár, samtykkir til, at ein kann hava tilfarið í hondum. Tað vil eisini siga, at samtykki altíð kann takast aftur.
15) Ásetingarnar viðvíkjandi treytir í sambandi við dóm fyri ávís kynslig brotsverk verða dagførdar og gjørdar greiðari.

Broytingar aðrastaðni í revsilógini bera í høvuðsheitum í sær:

1) At fyrningin fyri ymisk kynslig brot verður útsett til órættaði fyllir 21 ár. Hetta er eisini galdandi fyri blúnisbrot framt móti einum barnið undir 15 ár.
2) At ættleiðing verður javnsett við lívfrøðiligan skyldskap, viðvíkjandi samlegu millum skyldfólk í fallandi legg.
3) At ásetingin í revsilógin um tilhald verður strika. Hetta kemst av, at nýggj lóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing verður sett í gildið.

**Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið verður sent til ummælis hjá:

Føroya Rættur
Føroya Landfúti
Kriminalforsorgin
Mentamálaráðið
Almannamálaráðið
Heilsumálaráðið
Kommunufelagið
Barnaumboðið
Føroya Fróskaparsetur
Almannaverkið
Føroya advokatfelag
Revsiadvokatar
Føroyskir sálarfrøðingar
Sosialráðgevarafelagið
Sig Frá
Amnesty International
Kris
Antistalking bólkin
Barnabati
Kvinnuhúsið
Barnaverndarstovu Føroya
Javni
MBF
Gigni
Føroya lærarafelag
Føroya pædagogfelag
Føroya politistafelag

Greitt verður í stuttum frá, hvørjar viðmerkingar ummælispartarnir hava gjørt. Greitt verður eisini frá, hvørja støðu landsstýrismaðurin og stjórnarráðið hevur til hesar viðmerkingar. Hetta ger, at møguligar avleiðingar av lógaruppskotinum verða umhugsaðar og lýstar betur.

Eitt ummælisskjal kann eisini verða gjørt. Ummælisskjalið er ein stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingum hjá landsstýrismanninum til hesi. Serliga til uppskot, har nógv ummæli eru innkomin, er eitt ummælisskjal eitt hent amboð, sum gevur eitt greitt yvirlit yvir tey ummælini, sum eru komin inn.

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjal til lógaruppskotið.
(Heimild: nr. 1.2.16. í rundskrivinum).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**Umsintingaligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Tað vantast ikki at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Hetta eigur at umhugsast nærri.

Hevur lógaruppskotið avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir t.d. sosialar avleiðingar ella aðrar avleiðingar?

Hevur lógaruppskotið ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, skal tað verða tilskilað.
(Heimild: nr. 1.2.2.6. í rundskrivinum).

**Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Hetta eigur at kannast nærri.

Tað eigur at verða upplýst, um tað eru millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja. Her verður serliga hugsað um sáttmálar innan fakøkini hjá stjórnarráðunum. T.d. skattaavtalur, sáttmálar innan sosiala økið, útbúgvingarøkið, umhvørvisøkið, fiskivinnuøkið og vinnuøkið o.s.fr.

Greitt skal verða frá, um bindingar til millumtjóðasáttmála gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagbólkar ella vinnuna.

Hóast millumtjóðasáttmálar ikki eru á økinum, ella um uppskotið, hóast tílíkir sáttmálar eru, ikki fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar, skal tað verða tilskilað.
(Heimild: nr. 1.2.2.7. í rundskrivinum).

**Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

- Europarådets konvention om beskyttelse af børn mod seksuel udnyttelse og seksuelt misbrug m.v.
- Europarådets konvention til forebyggelse og bekæmpelse af vold mod kvinder og vold i hjemmet

Tað má skrivast meira um hetta og um hvussu lógaruppskotið sampakkar við EMRS og Sáttmálin um einstaklingar, ið bera brek

Tað eigur at verða upplýst, hvussu uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóða-sáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið, og hvussu og í hvønn mun Føroyar við lógaruppskotinum halda og menna krøvini, sum eru ásett í millumtjóðasáttmála.

Í lógaruppskotinum <u>skal</u> lýsast, hvussu lógaruppskotið sampakkar við hesar tvørgangandi sáttmálarnar:

1) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS, “Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention”. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við “Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap”.
   (Heimild: nr. 1.2.2.8. í rundskrivinum).

**Marknaforðingar**

Vantandi eru ikki marknaforðingar á hesum økinum. Tað má tó kannast nærri, hvussu ymisku forboðini í § 237 virka í mun til hini norðanlondini og innan ríkisfelagsskapin.

**Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Tað má greiðast nærri frá, hvørji inntriv vera gjørd í rættindi hjá fólki, og grundgevast má, hvi hildið verður, at inntrivið er neyðugt. Eisini má ein meting gerast, um inntrivið stendur mát við lógarbrotið og við endamálið við uppskotinum

**Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skatt og avgjøld

**Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólk skyldur.

**Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið legur ikki heimildir til nakran landsstýrismann ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Tað má kannast nærri, um uppskotið óbeinleiðis gevur myndugleikar víðari atgongd til privata ogn enn lógin longu gevur. Um so er má greiðast nágreiniliga frá vavninum av hesum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri, kann greiðast frá teimum her.
(Heimild: nr. 1.2.2.16. í rundskrivinum).

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

**Til nr. 1**
Nú arbeiði við at føroyska revsilógin er byrja, er náttúrligt at lógin fær eitt føroykst heiti.

**Til nr. 2**
"Straffeloven" hevur altíð verið nevnd "Revsilógin". Lógin fær tí hetta sum stytt heiti.

**Til nr. 3**
§ 93 viðvíkur fyrning av revsiábyrgd. Talan er um eina fylgibroyting, tí §§ 224 og 225 vera løgd saman í eina grein § 225. Broytingaruppskotið hevur ongar innihaldsligar broytingar við sær í mun til galdandi rætt.

**Til nr. 4**
§ 94, stk. 4 viðvíkur útsetan av fyrningini til órættaði er 18 ár.

Tað verður skotið upp at broyta ásetingin, soleiðis at fyrningin fyri brotsverk fevnd av ásetingini verður útsett til órættaði er fylt 21 ár, um órættaði var undir 18 ár tá brotið varð framt. Fyri blúnisbrot tó um órættaði var undir 15 ár, tá brotið varð framt.

Harafturat verður skotið upp, at víðka ásetingin viðvíkjandi útsettan av fyrning til órættaði er fylt 21 ár, til eisini at fevna um:

1) § 221, um at sníkja seg til samlegu við at misnýta at órættaði/a tekur gerningsmannin fyri ein annan,
2) § 224, um at medvirka til, at persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda og um tann, ið sum kundi fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við persón undir 18 ár,
3) § 226 um at taka pornografiskar myndir, film ella tílíkt av persóni undir 18 ár,
4) § 227, stk. 1 um at medvirka til, at persónur undir 18 ár er við í pornografiskari framførslu
5) § 260, stk. 2 um tá ein persónur undir 18 ár við tvingsil verður noyddur til vígslu.
6) § 232, um blúnisbrot, um blúnisbrotið er farið fram móti einum barnið undir 15 ár. Hetta vil siga, at um brotið er farið fram áðrenn barnið er fylt 15 ár, byrjar fyrningarfreistin fyrst at renna, tá ið órættaði er fylt 21 ár.
7) §§ 244, 245 og 246 um harðskap, tá ið talan eru um fosturtøka, fosturfækkan ella sterilisering móti einum persóni undir 18 ár uttan samtykki, um hetta ikki er heimilað í lóg.

Hetta eru broytingar í mun til galdandi rætt.

Broyting nr. 5, viðvíkjandi tvingsilsgiftu og broyting nr. 7, viðvíkjandi fosturtøka, fosturfækkan og sterilisering við tvingsli gera tað møguligt at seta í gildi Europarådets konvention til forebyggelse og bekæmpelse af vold mod kvinder og vold i hjemmet.
Broyting nr. 5 ber í sær, at fyrningin, fyri við tvingsil at noyða ein persón undir 18 ár til hjúnalag ella átrúnaðarliga vígslu, sum ikki hevur borgarligt gildi, verður útsett til órættaði fyllur 21 ár. Broyting nr. 7 ber í sær, at likamsárás, sum er fevnd av §§ 244, 245 ella 246 og sum viðvíkur fosturtøku, fosturfækkan ella sterilisering móti einum persóni undir 18 ár uttan samtykki, ikki

byrjar at fyrnast fyrr enn órættaði fyllur 21 ár. Hugtøkini fosturtøka, fosturfækkan og sterilisatión, skal skiljast á sama hátt, sum í heilsulóggávuna.

Afturat hesar broytingar verður skotið upp, at leingja útseta fyrningin aftaná órættaði er fylt 21 ár, í teimum førum har gerningsmaðurin á revsiverdan hátt hevur tvungið órættaði til ikki at melda lógarbrotið til løgregluna.

Nýggja ásetingin hevur bert týdning, um tvingsilin ikki er hildin uppat áðrenn órættaði er fylt 21 ár. Ásetingin er galdandi, hóast tað í millum gerningsløtan og tíðin órættaði fylti 21 ár, hava verið tíðarskeið har eingin tvingsil hevur verið. Um tvingslin er hildin uppat áðrenn órættaði/a fyllur 21 ár, byrjar fyrningin at renna, tá ið órættaði er fylt 21 ár.

Ásetingin er galdandi, um gerningsmaðurin við harðskapi ella øðrum ólógligum tvingsli sambært § 260 ella á annan hátt við revsiverda gerð hevur tvungið órættaði til ikki at melda lógarbrotið til løgregluna. Ásetingin vil millum annað kunna nýtast í sambandi við, at gerningsmaðurin við hóttanir um harðskap ger seg inn á órættaði í samband við at órættaði/a væntandi skal geva frágreiðing til løgregluna ella í rættin sambært § 123 í revsilógina ella um gerningsmaðurin tekur frælsi frá órættaði/a sambært § 261 í revsilógina.

Ein fyritreyt fyri at nýta ásetingin er, at tað kann prógvast, at gerningsmaðurin objektivt og við neyðugt skil (fornøden tilregnelse) hevur tvungið órættaði til ikki at melda hetta sama kynsliga brotsverkið til løgregluna. Gerningsmaðurin skal hava gjørt hetta við einum revsiverdum gerði sum hevur hildið fram eftir at órættaði/a er fylt 21 ár.

Tað er tó ikki eitt krav, at gerningsmaðurin er revsaður ella kann revsast fyri tann revsiverda gerðin, har órættaði/a var tvungin til ikki at melda kynsliga brotsverkið til løgregluna. Tað hevur sostatt einki at siga, at gerningsmaðurin ikki kundi ábyrgdast (var utilregnelig) tá revsiverda gerðin fór fram, har órættaði/a var tvungin til ikki at melda kynsliga brotsverkið til løgregluna. Heldur ikki hevur tað nakað at siga, um revsiábyrgdin fyri gerðin er fyrna ella um hetta ikki hoyrir undir danskan revsimyndugleika.

Tvingsilin til ikki at melda lógarbrotið kann bæði vera ein fysisk forðing sum dráp ella frælsistøka og til dømis harðskap ella revsiverdar hóttanir. Tað er eitt krav, at tað er orsakasamband millum revsiverda gerðin og tað at órættaði/a ikki meldar kynsliga brotsverkið til løgregluna.

Rættarvirknaðin av at gerningsmaðurin á hendan hátt við revsiverda gerð hevur tvungið órættaði/a til ikki at melda kynsliga brotsverkið til løgregluna er, at fyrningin av revsiábyrgdin fyri hetta lógarbrotið fyrst byrjar at renna, tá ið tvingsilin er hildin uppat. Um tvingsilin ongantíð ongantíð heldur uppat, til dømis tí gerningsmaðurin hevur dripið órættaði/a, er avleiðingin, at fyrningarfreistin ongantíð byrjar at renna, og at revsiábyrgdin tískil ongantíð fyrnast.

Í mun til hesa áseting heldur tvingsilin uppat, tá revsiverda gerðin ikki longur virkar avgerðandi fyri um orættaði/a ikki meldar hetta kynsliga brotið til løgregluna. Metingin av nær hetta er, má gerast út frá ítøkiligu umstøðurnar í málinum, men hetta vil vanliga vera rættiliga stutt tíð eftir, at revsiverda gerðin er hildin uppat. Tað avgerðandi er sostatt, um órættaði/a enn er tvungin til ikki at melda kynsliga brotið til løgregluna og ikki um órættaði/a letur vera við at melda brotið, tí tað til dømis nú er gingin sera long tíð síðani kynsliga brotsverkið var framt.

Tá ið tvingsilin einaferð er hildin uppat aftaná at órættaði/a er fylt 21 ár, byrjar fyrningarfreistin at renna. Fyrningarfreistin heldur áfram at renna, hóast gerningsmaðurin seinni við nýggjari revsiverdari gerð tvingar órættaði/a ikki at melda kynsliga brotsverkið til løgregluna.

**Til nr. 5**
*§ 210, stk. 1*
Sambært ásetingini verður samlegu millum skyldfólk í fallandi legg revsa. Í § 210, stk. 3 verður ásett at stk. 1 og stk. 2 galda samsvarandi í samband við aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.
Skotið verður upp, at ættleiðing verður javnsett við lívfrøðiligan skyldskap í mun til forboði móti blóðskemd .
Hetta ber í sær, at tað framyvir verður revsivert at hava kynsligt samband við ættleitt barn yvir 18 ár, og at kynsligt samband við ættleitt barn undir 18 ár framyvir verður revsa eftir § 210 í staðin fyri eftir § 223, stk. 1.
Tað verður eingin broyting gjørd í revsiramman, sum er fongsul upp til 6 ár. Hetta gevur møguleika at nýta tey revsurættarligu inntriv, sum sambært rættargangslógini krevur ein revsiramma uppá fongsul í minst 6 ár.
Hetta ber samstundis í sær, at fyrningarfreistin fyri revsiábyrgd er 10 ár sambært § 93, stk. 1 í revsilógini.

Hetta ber í sær, at revsiramman fyri kynsligt samband við ættleitt barn undir 18 ár fer úr 4 ár upp í 6 ár og at fyrningarfreistin fer úr 5 ár upp i 10 ár.

Sambært uppskotið verður kynsligt samband við lívfrøðilig børn hjá ættleiddum børnum ella ættleidd børn hjá lívfrøðiligum børnum og víðari í fallandi legg umfattaði av § 210, stk. 1. Sambært galdandi rætt er tílíkt samband bert revsivert, um talan er um kynsligt samband við barn undir 15 ár.

Ættleiðing eftir hesa áseting viðvíkur ættleiðing sum hevur alment gildið eftir føroyskari lóggávu, umframt eftir altjóða eginrættur.

Ættleiðingin er galdandi, um hon ikki verður sett úr gildi Um ættleiðingin verður sett úr gildi, er ásetingin ikki galdandi fyri kynsligt samband millum fyrrverandi ættleiðingar foreldri og fyrrverandi ættleidda barnið, um hetta hendir eftir at ættleiðing er sett úr gildi.

*§ 210, stk. 2.*
Ásetingin viðvíkjandi kynsligt samband millum systkin verður ikki broytt. Tað vil siga at ásetingin bert er galdandi millum lívfrøðilig systkin.

*§ 210, stk. 3*
Ásetingin knýtir seg til § 210, stk. 1 og 2 um samlegu við skyldfólk í fallandi legg og samlegu millum systkin. § 210, stk. 3 er í galdandi lóggávu býtt í tvey lið, sum áseta at § 210, stk. 1 og 2 eisini eru galdandi fyri kynsligt samband við ein persón av sama kyni og fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlega.
Tað verður skotið upp, at sláa bæði lið saman til eitt lið, um aðrar kynsligar gerðir enn samlega. Hetta samsvarar við uppskotið um at sláa § 224 og § 225 saman til eina áseting í § 225 (Sí undir § 1, nr. 6 )
Uppskotið ber í sær, at “samlega” sambært § 210, stk. 1 og stk. 2, sum nakað nýtt eisini fer at fevna um anal samlega, bæði millum persónar av sama kyni og millum persónar av ymiskum kyni.
Tað er ikki ætlanin, at hetta skal broyta metingin av hvussu grov tílík gerð er í mun til vaginala samlegu ella í mun til aðrar kynsligar gerðir. Tað er sostatt ongin ætlan um at broyta revsiásetingin í mál viðvíkjandi anala samlegu í mun til verandi revsistøði.

**Til nr. 6**
*Til yvirskriftin*
Skotið verður upp, at nevna kapittulin "Kynslig brotsverk" heldur enn til dømis "Siðamisbrot", sum kanska hevur verið tað meira nýta heiti fyri hesi brotsverk. Siðamisbrot, sigur nakað um at brotsverkið ger seg inn á almenna siðalæra. Við at geva kapittulin heitið "Kynslig brotsverk" gevur hetta boð um brotsverk, har man ger seg inn á kynsliga sjálvavgerðarrætturin og kynsliga frælsi.

*Til § 216*
Skotið verður upp at víðka ásetingin til at eisini at fevna um annan ólógligan tvingsil (galdandi § 217), misnýtsla, har tann órættaði er í slíkum tilstandi ella slíkari støðu, at viðkomandi iki er førur fyri at seta seg upp móti gerðini (galdandi § 218, stk. 2 (misnýtsla av tilstandi) og § 232 (misnýtsla av støðu)) og samlegu við barn undir 12 ár (galdand § 222, stk. 2, 1. lið sbrt. § 1).

Tað verður lagt til grund, at "samlega" framyvir, sum nakað nýtt, eisini fevnir um anal samlega, hetta merkir heil ella partvís innførsla av kynslimin í anus millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

Tað verður skotið upp óbroytt, at tað at noyða ein annan til samlegu við harðskapi ella hóttan um harðskap verður revsa sum neyðtøku sambært § 216, stk. 1, nr. 1 í uppskotinum. Tað er ikki ætla at gera nakra broyting í, hvat verður skilt við "at noyða við harðskapi ella hóttan um harðskap". Ásetingin fer tí framvegis óbroytt at fevna um eisini mildari sløg av harðskapi og eisini bert tað at halda onkran fast (den blotte fastholdelse)

Tað verður eisini skotið upp óbroytt, at tað at noyða ein annan til samlegu við at seta órættaði í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp móti gerðini, verður revsa sum neyðtøka. Hetta er fevnt av § 216, stk. 1, nr. 2, 2. lið í uppskotinum.

Hendan partin av ásetingini hevur óbroytt bert sjálvstøðuga týdning, um setan av órættaði í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp móti gerðini, er hend uppá aðrar mátar enn við harðskap. Er hetta hent við harðskap, hevur hetta í sær sjálvum við sær, at talan er um neyðtøku.

Fyri tey sløg av neyðtøku, sum longu finnast í galdandi § 216, verður skotið upp eina óbroytta revsirammu við fongsul í upp til 8 ár og eina herða revsirammu við fongsul í upp til 12 ár. Í hesum førum sum eru fevnd av galdandi § 216, er ikki tilætla nøkur broyting í nýtsluøki fyri vanligu revsirammuna og herða revsirammuna ella í revsiásetingin í mun til í dag.

Áherðslu má tó leggjast á, at revsiáseting í neyðtøkumálum skal gerast við støði í eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Metast má um eyðkenni (karakter) við neyðtøkuni og aðrar umstøður, ið vitan er um. Revsiásetingin má ikki gerast við støði í eina meira alment ymisk meting av grovleika av kontaktneyðtøku (kontaktvoldtægt) og neyðtøku í parlagi (parvoldtægt) í mun til álopsneytøka (overfaldsvoldtægt). Tá talan er um álop, vil hetta tó vanliga vera ein herðandi umstøða, og revsingin fyri álopsneyðtøka vil tí eisini vanliga vera strangari enn revsingin fyri kontaktneyðtøka ella neyðtøka í parlagi.

Skotið verður upp, sum nakað nýtt, at ein og hvør samlega við barn undir 12 ár framyvir skal revsast sum neyðtøku við eina revsurammu uppá fongsul í upp til 12 ár sambært § 216, stk. 2. Hetta inniber, at § 222, stk. 1, sbrt. stk. 2 , 1. lið, verður flutt til § 216. Sostatt er talan um

óbroytt brotsliggerðan við óbroytta revsurammu. Ætlanin er ikki at gera broytingar í revsiásetingin í mun til í dag. Tað er tí eisini ein fyritreyt, at hóast brotsverkið framyvir verður nevnt “neyðtøka” so kann treytaðan dóm við treyt um sexologisk viðgerð framvegis nýtast í sama mun sum í dag.

Tað er ein fyritreyt fyri at nýta uppskotna § 216 um samlegu við barn undir 12 ár, at gerningsmaðurin hevði tilætlan viðvíkjandi um barnið var undir 12 ár. Um gerningsmaðurin bert handlaði í ósketni í mun til, um barnið var undir 12 ár, so skal gerðin dømast eftir § 222 í revsilógina viðvíkjandi samlega við barn undir 15 ár.

Í mun til útflýggjan av barnaváttanir, er neyðugt í revsiskránna (kriminalregistret) at skráseta dómssøgn fyri samlegu við barn undir 12 ár fyri seg og ikki bara sum neyðtøka. Tískil eigur tað í ákærurit og dómar um brot á § 216, framyvir greitt at ganga fram, um dømt verður fyri brot á nýggja neyðtøku ásetingin viðvíkjandi samlegu við barn undir 12 ár.

Um so er, kann revsast í samanstoyt fyri brot á § 216, stk. 1 og § 216, stk. 2.

Skotið verður upp, at viðurskifti sum í dag eru fevnd av § 217 ella § 218, stk. 2 framyvir skulu fevnast av § 216 um neyðtøku, sí uppskot til § 216, stk. 1, nr. 2. Ásetingarnar snúgva seg um, at skaffa sær samlegu við at nýta annan ólógligan tvingsil sbrt. § 260 og um at skaffa sær samlegu við ein persón, sum er í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini.

Samstundis verður skotið upp, at ásetingin um at skaffa sær samlegu við ein persón, sum er í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini, skal víðkast til eisini at fevna um, at skaffa sær samlegu við ein persón, sum er í slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini.

Uppskotið ber í sær, at brotsliggerðing av hesi viðurskifti verða flutt úr § 232 um blúnisbrot til § 216.

Uppskotið miðar í móti støður, har gerningsmaðurin hevur møguleika fyri at taka órættaði á bóli og byrja samlega ella annað kynsligt samband, sí uppskot til § 225, uttan at órættaði hevur tíð at reagera, hóast órættaði annars er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini. Um órættaði vegna sín tilstand, ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini, skal skal støðan dømast út frá hetta liðið í ásetingini.

Hetta vil vanliga vera støður, har órættaði er heilt ella partvíst úrlatin og har gerningsmaðurin hevur ein lógligan grund til at nema við órættaði. Hetta kann til dømis verða hjálp við reinføri, læknakanningar, vøddamýking og líknandi. Við “umstøður” meinast ítøkiligar fysiskar umstøður og ikki umstøður sum uppá aðrar mátar eru serliga sárbarar, sum til dømis fíggjarligur bundinskapur.

Harafturat verður skotið upp, at ásetingin um at skaffa sær samlegu við ein persón, sum er í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini, verður víðka til eisini at fevna um samlegu innan hjúnalagið.

Skotið verður upp at revsiramman fyri viðurskifti, sum í dag eru fevnd av § 217 ella § 218, stk. 2, skal vera tann sami sum eftir galdandi § 216 um neyðtøku, tað vil siga ein vanlig revsiramma uppá fongsul í upp til 8 ár og ein herð revsiramma uppá fongsul upp til 12 ár. Tað sama er

galdandi viðvíkjandi uppskotnu víðkanirnar í mun til støður innan hjúnalagi og til at skaffa sær samlegu við persón, sum er í slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini.

Uppskotið ber í sær, at fyrningin fyri tey viðurskifti sum nú vera fevnd av § 216 um neyðtøku, verður longd úr 5 ár upp í ávikavist 10 ár ella 15 ár, treyta av, um vanliga revsiramman verður nýtt ella herða revsiramman. Uppskotið ber eisini í sær, at revsirættarlig tvingsilsinntriv, sum krevja ein revsiramma uppá 6 ár, nú, sum nakað nýtt, kunnu nýtast í samband við hesi mál.

At viðurskifti, sum í dag eru fevnd av § 218, stk. 2 eru flutt til § 216, ber sum nakað nýtt í sær, at tað í tílík mál vil kunnu gevast treytir eftir nýggja § 237 í revsilógini.

Uppskotið ber eisini í sær, at dóm fyri brot, sum í dag eru fevnd av § 218, stk. 2 ella § 232, men framyvir eru fevnd av § 216, ikki skulu strikast úr kriminalregistrets efterforskningsdel fyrr enn gerningsmaðurin er fyltur 80 ár. Hetta er galdandi fyrr allar dómar fyri brot á §§ 216 og 217, meðan dómar fyri brot á § 218 og 232 verða strika eftir 20 ár.

Sambært uppskotinum verður revsingin herð fyri viðurskifti, sum í dag eru fevnd av § 218, stk. 2. Tað ætlaði revsistøði fer eisini at vera galdandi fyri brot innan hjúnalagið og fyri misnýtsla av hjálpaleysa støðu hjá órættaði.

Uppskotið miðar ímóti, at støði fyri revsiásetingini fyri ein einstakan fullgjørdan tilburð av at skaffa sær samlegu við ein person, sum er í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini, framyvir skal vera 8 mánaðar fongsul. Um gerningsmaðurin hevur sett órættaði í einum slíkum tilstandi, har viðkomandi ikki hevur verið førur fyri at seta seg ímóti gerðini, uttan at gerningsmaðurin tó hevur gjørt hetta við tilætlan um at skaffa sær samlegu, skal tað tó við revsiásetingini framyvir, leggjast eitt hægri støði, sum avspeglar, at støðan nærkar seg neyðtøku (kontaktneyðtøka).

Uppskotið miðar eisini ímóti, at gera broytingar í revsiásetingini í mun til dag, tá tað kemur til samlegu við einum persóni, sum er í slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini, har viðkomandi verður tikin á bóli. Ætlanin er, at revsiherðingin viðvíkjandi støður, sum í dag eru fevnd av § 218, stk. 2, eisini skulu fevna um støður, har órættaði verður tikin á bóli, í tann mun talan er um at misnýta eitt serligt álit sum byggir á starvið hjá gerningsmanninum ella líknandi. Um tað hendingaferð ikki skuldi vera talan um at misnýta eitt serligt álit, er ikki ætlanin at gera broytingar í revsiásetingini í mun til í dag, har støða, har órættaði verður tikin á bóli, verður revsa sum blúnisbrot. Tað skal harafturat vera gjørt vart við, at tað við revsiáseting í ítøkiliga málið millum annað eigur ganga inn hvat slag av kynsligt samband talan er um, og at hetta vil kunna føra við sær eitt lægri miðal revsistøði í førum har órættaði var tikin á bóli, í mun til onnur brot á uppskotna § 216, stk. 1, nr. 2, 2. lið, tí hesi føri ofta fevna um mildari stig av annað kynsligt samband enn samlega og ógvuliga sjáldan um fullgjørda samlegu.

Í trá við vanligum revsiásetingarreglum vil revsingin kunna ásetast hægri í til dømis endurtøku førum ella um talan er um fleiri føri sum vera dømd í senn. Hinvegin vil revsingin kunna ásetast lægri við til dømis brotsroynd.

Revsiásetingin eigur harafturat at taka støði í ítøkiligu umstøðunum í hvørjum einstøkum málið. Ítøkiliga revsingin fyri ein einstakan fullgjørdan tilburð av at skaffa sær samlegu við einum persóni, sum er í slíkum tilstandi, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti

gerðini kann tí, treyta av ítøkiligu umstøðunum, ásetast hægri ella lægri enn ætlaða støði uppá 8 mánaðar fongsul.

Dømi um viðurskifti, sum kunnu ganga inn í metingin av grovheitin av brotið og harvið áseting av revsing, kann vera eyðkenni av kynsliga sambandið ( samlega ella annað kynsligt samband enn samlega, og í so fall hvat slag av kynsligt samband), hvussu leingi valdsgerðin, mált í tíð, fer fram, hvussu hjálparleysur órættaði er, aldur hjá órættaði, hvar valdsgerðin er farin fram, undir hesum um gerningsmaðurin hevur brotið seg inn hjá órættaði og undir hvørjum umstøðum gerningsmaðurin hevur hitt órættaði, undir hesum hvussu møguligt samband frammanundan er farið fram.

Lýstu umstøðurnar eru ikki úttømandi, og áseting av revsing valdast framvegis ítøkiliga metingin hjá dómstólinum í hvørjum einstakum føri av øllum umstøðum í málinum. Víkjast kann frá áseta revsistøði bæði upp og niður, um tað í ítøkiliga málið eru herðandi ella blíðkandi umstøður, sí annars vanligu reglurnar um áseting av revsing í kapittul 10 í revsilógina.

Tað er ikki ætlanin við uppskotið at gera broytingar í revsistøði fyri tey brot, sum í dag eru fevnd av § 217 í revsilógina.

Skotið verður upp at lógarfesta, at tað við áseting av revsing vanliga skal innganga sum herðandi umstøða, at órættaði hevur verið fyri menniskjahandli.

Ásetingin miðar ímóti hendingar, har gerningsmaðurin til eina neyðtøku hevur tilætlan til, at tað kynsliga sambandið hendir í samband við, at órættaði verður misnýtt við prostitutión sum liður í menniskjahandli sbrt. § 262.
Ásetingin fevnir harvið um føri, har ein kundi, ikki sjálvur hevur nýtt harðskap ella hóttanir, men hevur ein avgjørdan varhuga av, at tann prostitueraði verður misnýtt sum lið í menniskjahandli og tí fremur kynsliga sambandi vegna harðskap ella annan ólógligan tvingsil frá triði maður.

*Til § 217*
Av tí at annan ólógligan tvingsil verður flutt til § 216, verður § 217, sum avleiðing av hesum strika.

*Til § 218, stk. 1*
Ásetingin viðvíkur tað at skaffa sær samlegu við at misnýta annans sálarsjúku ella sálarliga menningartarn.
Skotið verður upp, at víðka ásetingin til eisini at fevna um at skaffa sær samlegu innan hjúnalagið. Tað vil siga, at pør sum liva saman og eru gift, í mun til § 218 skulu metast uppá sama máta, sum pør sum liva saman uttan at vera gift. Tað vil siga, at tað sum er avgerandi fyri um § 218 kann nýtast er, at talan er um at misnýta sálarsjúku ella sálarliga menningartarn hjá makanum.
Uppskotið ber harafturat í sær, at sambandi millum hjúnafelagar, sum ikki liva saman, skal metast á sama hátt, sum sambandi millum aðrar persónar, sum ikki liva saman.
Samlega eftir hesi áseting fevnir, sum nakað nýtt, eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni  vera fevndar av § 225 í revsilógina.

*Til § 218, stk. 2*
Tað verður skotið upp, at ásetingin í § 216 viðvíkjandi neyðtøku, verður víðka til eisini at fevna um misnýtslu av tilstandi ella slíkari støðu, at órættaði ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini. Sum avleiðing av hesum, verður skotið upp at § 218, stk. 2 verður strika, soleiðis at § 218 bara fær eitt stykki.

*Til § 219*
Skotið verður upp, at § 219 verður býtt upp í trý nummur, fyri at gera greinina greiðari og betri skipaðan. Greinin verður skipa soleiðis at:

- nr. 1 viðvíkur stovnar hjá brotsmálaumsorganini
- nr. 2 viðvíkur frælsisskerd í varðhaldi hjá løgregluni
- og nr. 3 viðvíkur aðrar stovnar

ad 1: Skotið verður upp at broyta ásetingin viðvíkjandi stovnar hjá brotsmálaumsorganini, soleiðis at tað fullkomiliga banni móti at hava samlegu við einum persóni sum hevur tilhald i einum av stovnunum hjá brotsmálaumsorganini verður fyri einum sum starvast hjá brotsmálaumsorganini og hevur myndugleika yvir viðkomandi.
Við starv hjá brotsmálaumsorganini verður meint persónar sum starvast hjá Dirktoratet for Kriminalforsorgen og allar undirliggjandi myndugleikar og stovnar, herundir fongslir, arresthús, varðhald, vistarhald og brotsmálaumsorganin í frælsi. Ásetingin er galdandi fyri persónar sum eru í starv, tað vil eisini siga persónar sum er í fyribilsstarv, persónar í parttíðarstarv og og persónar í ólønt starv.
Við myndugleika yvir viðkomandi verður meint persónar, sum kunnu hava ávirkan á umstøðurnar hjá tí innsetta. Tað hevur einki at siga, um persónin hevur formligan rætt at taka avgerð í mun til tann innsetta.
Forboðið móti samlegu er galdandi í alt tíðarskeiði har viðkomandi hevur tilhald í einum av stovnunum hjá brotsmálaumsorganini, eisini undir útgongd og frígongd, innlegging á sjúkrahúsið og annað, men ikki eftir leysgeving, herundir royndarleysgeving.
Forboðið kann eftir eina ítøkiliga meting, strekkjast til at galda í eitt styttri tíðarskeið, har viðkomandi ikki er komin aftur í aftur eftir útgongd ella frígongd ella eftir rýming, men síðani má tilhaldi á stovninum sigast at vera hildið uppat.

ad 2: skotið verður upp ein nýggj áseting um fullkomið bann móti samlegu og aðrar kynsligar gerðir millum ein persón sum starvast hjá løgregluni og ein persón, sum er frælsisskerdur og í varðhaldi hjá løgregluni.
Forboðið er galdand fyri øllum sum starvast hjá løgregluni, tað vil siga, eisini persónar sum eru í fyribilsstarv, persónar í parttíðarstarv og og persónar í ólønt starv.
Forboðið viðvíkur kynsligt samband, sum hendir meðan persónurin er frælsisskerdur og í varðhaldi hjá løgregluni. Grundarlagið fyri frælsisskjerjingin er uttan týdning.
Forboðið fevnir eisini um varðhaldsfongslaði og revsifangar, sum fyribils eru í varðhaldi hjá løgregluni til dømis undir flutning. Forboði fevnir eisini um útgongd við fylgjara, um tað er løgreglan, sum er fylgjari hjá viðkomandi.
Forboðið er ikki galdandi tá frælsisskerjingin er av, ella tá ið viðkomandi ikki longur er í varðhaldi hjá løgreglufeni, hóast frælsisskerjingin ikki er av.

ad 3: skotið verður upp at lata ásetingarnar í § 219 viðvíkjandi øðrum stovnum verða óbroytar. Undantikið er, at vistarheim verður tikin úr ásetingini. Harumframt vera heitini fyri ymisku stovnarnar, sum eru fevndar av ásetingini, gjørd meira tíðarhóskandi.

Ásetingin er framvegis galdandi fyri persónar, sum starvast á viðkomandi stovn, tað vil siga, eisini persónar sum eru í fyribilsstarv, persónar í parttíðarstarv og og persónar í ólønt starv, umframt persónar sum hava eftirlit við viðgerðin av persónum sum eru skrivaðar inn á viðkomandi stovn. Í mun til uppskotið til nummar 1, eru øll sum starvast á viðkomandi stovn fevnd av forboðið móti samlegu og aðrar kynsligar gerðir, óansæð um hann hevur myndugleika yvir tann, sum er skrivaður inn á stovnin.
Forboðið móti samlegu og aðrar kynsligar gerðir er galdandi fyri ein sum starvast á stovnin og ein persón sum er skrivaður inn við ætlan um at gista nátt á stovnin. Ásetingin er sostatt ikki galdandi fyri ein persón, sum bert hevur daguppihald á stovninum. Dømi um hetta, kann vera sjúkling í ambulanta viðgerð á psykiatriskari deild, ella ein persón, sum luttekur í ymisk virksemi á einum dagtilhaldi, vardum verkstaði ella líknandi, uttan at hava samdøguruppihald á stovninum.
Ásetingin er galdandi alt tíðarskeiði viðkomandi er skrivaður inn á stovnin. Tað vil siga eisini um viðkomandi fyribils gistir nátt uttanfyri stovnin til dømis í samband við samveru við familju, vikuskiftisuppihald hjá umlættingar- ella fosturforeldur, innlegging á sjúkrahús og annað. Ásetingin er eisini galdandi í samband við námsferð ella frítíðarferð, sum verður gjørd undir virkisøki hjá stovninum.
Ásetingin er ikki longur galdandi, tá ið stovnsuppihaldi er av, harundir í samband við flyting til annan stovn.
Forboðið kann eftir eina ítøkiliga meting, strekkjast til at galda í eitt styttri tíðarskeið, har viðkomandi ikki er komin aftur í aftur eftir útgongd ella eftir rýming, men síðani má uppihaldi á stovninum sigast at vera hildið uppat.

Samlega eftir hesi áseting fevnir sum nakað nýtt eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

Revsiramman í § 219 er óbroytt, og ætlanin er ikki at gera broytingar í revsiásetingin í mun til í dag.

*Til § 220*
Tað verður skotið upp, at víðka ásetingin í § 220 um at skaffa sær samlegu við grovari misnýtslu av annans arbeiðsliga og fíggjarliga tørv, til eisini at fevna um grova misnýtslu av viðgerðarliga og røktarliga tørvi.

Grov misnýtsla av viðgerðarliga tørvi fevnir um persónar, sum eru í drúgva viðgerð við turvelvandi heilivági, um tað er ein sterkur bundinskapur millum viðgerandi lækni og viðkomandi og læknin groft misnýtur hendan bundinskapur til at skaffa sær samlegu við sjúklingin.
Grov misnýtsla av viðgerðarliga tørvi fevnir eisini um onnur føri av samsvarandi sterkum bundinskapi millum ein lækna ella annan viðgerði og einum sjúklingi og samsvarandi grov misnýtsla av lækni ella viðgeri.

Grov misnýtsla av røktarliga tørvi fevnir um persónar sum fáa víttfevnandi røktarlig hjálp i egnum heimi, á einum viðgerðarstovni, sambýli ella annað, um tað er ein sterkur bundinskapur millum røktarar og viðkomandi og hendan bundinskapur verður grovt misnýtt til at skaffa sær samlegu við viðkomandi.

Tað verður eisini skotið upp, at víðka § 220 til at fevna um at skaffa sær samlegu í hjúnalagið.
Tað vil siga, at pør sum liva saman og eru gift, í mun til § 220 skulu metast uppá sama máta, sum pør sum liva saman uttan at vera gift. Tað vil siga, at tað sum er avgerandi fyri um § 220 kann nýtast er, at talan er um grov misnýtsla av arbeiðsliga, fíggjarliga, viðgerðarliga ella røktarliga tørvin hjá makanum.
Tað verður lagt til grund, at nýtslu av fíggjarligan tørv, sum avleiðing av hjúnalagið ella samlív uttan hjúnalag sum trýstvápn til at fáa samlegu, vanliga ikki verður mett sum "grov misnýtsla" í § 220 merking. Til dømis verður ikki mett, at tað at skaffa sær samlegu við hóttanir um hjúnaskilnað ella samlívsslit er grov misnýtsla í § 220 merking. Hetta er galdandi hóast ein hjúnafelagi møguliga eisini hóttir við at drála við búskifti ella hóttir við at fáa fútarættin til at hjálpa við at fáa hin sett út úr felags bústaðin beinanvegin og hin hjúnafelagin kemur ógvuliga illa fyri, um hesar hóttanir gerast álvari.
Ítøkiligar hóttanir um ikki at vilja gjalda álagdir uppihaldspengar til tíðina ella sjálvur ólógliga seta hjúnafelagin út úr felags bústaðin, vil hinvegin vanliga vera "grov misnýtsla" í § 220 merking. Hetta vil kunna revsast, um hin hjúnafelagin hevur stóran tørv á at fáa uppihaldspengar til tíðina ella eisini hevur stóran tørv á av vera búgvandi í felags bústaðin. Hjúnafelagin skal eisini hava tilætlan at fáa hin hjúnafelagin at játta samlegu vegna hesum.
Tað má gerast ein ítøkilig meting um tað at skaffa sær samlegu við ein hjúnafelagi, sum er sterkt bundin at hjúnafelagin vegna viðgerðar- ella røktartørv er grov misnýtsla av viðerðarliga ella røktarliga tørvi í § 220 merking.
Sum omanfyri verður ikki mett, at tað at skaffa sær samlegu við hóttanir um hjúnaskilnað ella samlívsslit er grov misnýtsla í § 220 merking. Hetta eisini hóast hjúnaskilnaðin ella samlívsslitið ber í sær, at viðgerðin ella røktin sum hjúnafelagin hevur stóran tørv á steðgar.
Ítøkiligar hóttanir um at steðga viðger ella røkt, sum hjúnafelagin hevur stóran tørv á, uttan at hetta hevur samband við hjúnaskilnað ella samlívsslit, kann eftir umstøðunum vera grov misnýtsla í § 220 merking.
Uppskotið ber harafturat í sær, at sambandi millum hjúnafelagar, sum ikki liva saman, skal metast á sama hátt, sum sambandi millum aðrar persónar, sum ikki liva saman.

Samlega eftir hesi áseting fevnir, sum nakað nýtt, eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

Tað verður skotið upp, at broyta aldurin, sum ber í sær skerpaða revsiramma, úr 21 ár til 18 ár. Hetta er grunda á, at ásetingin er gomul, og at 21 ár tá var lógaldur. Lógaldurin nú er 18 ár. Samstundis verður eisini skotið upp, at broyta skerpaða revsiramman, ið er galdandi um órættaði er undir 18 ár, soleiðis at revsiramman verður hækkað úr fongsul í 3 ár til fongsul í 4 ár.
Ætlanin er tó ikki at broyta nakað í revsiásetingini í mun til í dag.

*Til § 221*
Tað verður skotið upp, at ásetingin, um at sníkja seg til samlegu við ein persón, sum mistekur samlegan fyri at vera innan hjúnalagið, verður strika.
Hetta ber í sær, at tað framyvir ikki vil vera revsivert at hava samlegu við ein persón, sum, við hins vitandi, gongur við til samlegu, tí viðkomandi heldur at tey eru gift. Dømi um hetta kann vera, at partarnir eru gift eftir einum átrúnaðarligum halgisiði, sum ikki er galdandi sambært okkara lóggávu.

Eitt mistak, sum ikki viðvíkur hjúnarstøðuna, men hvør persónurin hevur samlegu við, vil áhaldandi vera fevnt av § 221. Dømi um hetta er, at A, sum er gift við B, hevur samlegu við C, tí A mistekur C fyri B.

Samlega eftir hesi áseting fevnir, sum nakað nýtt, eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

Skotið verður eisini upp, at lækka revsirammar úr 6 ára fongsul niður í 4 ára fongsul.
Hetta ber samstundis í sær, at tey revsirættarligu inntriv, sum sambært rættargangslógini krevur ein revsiramma uppá fongsul í minst 6 ár, ikki kunnu nýtast í samband við brot á § 221 í framtíðini.
Hetta ber eisini í sær, at fyrningin fyri brot á § 221 fer úr 10 ár niður í 5 ár sambært § 93, stk. 1 í revsilógini.

Skotið verður tó upp, sum nakað nýtt, at um órættaði er undir 18 ár, byrjar fyrningin av brot á § 221 fyrst at renna, tá órættaði er fylt 21 ár, sí broyting nr. 4.

Tað er ikki ætlanin, at lækking av revsiramman skal gera broyting í revsiásetingini, soleiðis sum hon er í dag.

*Til § 222§*
Tað verður skotið upp, at samlega við barn undir 12 ár, framyvir verður revsa sum neyðtøka sambært § 216 í revsilógina.

Tískil verður skotið at § 222 verður undirlagt (subsidiær) § 216, stk. 2 viðvíkjandi samlegu við barn undir 12 ár, soleiðis at § 222, stk. 2, 1. pkt. dettur burtur. Harafturat verður skotið upp, at ásetingin í stk. 3 viðvíkjandi misnýtslu av kropsligari ella sálarligari yvirvág, verður sett sum stk. 1, 2. pkt.

Uppskotið ber í sær, at í samband við revsing eftir nýggja § 216, stk. 2 um samlegu við barn undir 12 ár, skal ikki eisini revsast fyri brot á § 222. Um samlega við barn undir 12 ár, vegna manglandi tilætlan um at barnið er undir 12 ár, ikki kann revsast eftir § 216, vil § 222 harafturímóti kunna nýtast. Harafturat vil framvegis fyri børn í aldursbólkinum 12 – 14 ár kunna revsast í samanstoyt millum § 222 og ásetingarnar um neyðtøku í nýggja § 216, stk. 1.

Samlega eftir hesi áseting fevnir, sum nakað nýtt, eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

*Til § 223*
Tað verður skotið upp, at kynsligt samband við eitt ættleitt barn framyvir verður fevnt av ásetingin í § 210 viðvíkjandi blóðskemd. Sum avleiðing av hesum, verður ásetingin, um samlegu við eitt ættleitt barn, strika í § 223, stk. 1.

Samlega eftir hesi áseting fevnir, sum nakað nýtt, eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar

gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

*Til §§ 223 a-231*
Tað verður skotið upp at strika galdandi ásetingar í §§ 223 a-231 og ístaðin orða §§ 224-228 á nýggjum. Hetta er fyri at gera skipanin í revsilógina greiðari, umframt at nútímansgera nakrar ásetingar. Yvirskipa verða hesar broytingar skotnar upp í mun til verandi reglur:

1) Tað verður skotið upp, at seta eina nýggja áseting viðvíkjandi medvirkan til, at ein persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda, inn í § 224,stk. 1. § 223 a, viðvíkjandi tann, ið sum kundi fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við persón undir 18, verður so § 224, stk. 2.
2) Tað verður skotið upp at leggja ásetingarnar í § 224 viðvíkjandi aðrar kynsligar gerðir enn samlega millum hinskynd og § 225 viðvíkjandi kynsligt samband millum samkynd, saman í eina áseting. Hendan áseting verður í § 225 og viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlegu óansæð kyn.
3) § 230, 1. pkt,viðvíkjandi tann sum tekur pornografiskar myndir, filmar ella tílíkt av personi undir 18 ár, verður flutt til § 226. Ásetingin verður greiðari orða og revsramman herd.
4) Í § 227 verður ein nýggj áseting viðvíkjandi medvirkan til, at persónur undir 18 ár er við í pornografiskari framførslu. Verandi § 227, viðvíkjandi revsilækking ella revsiburturfall fyri brot á §§ 216-226 um gerningsmaðurin og órættaði gifta seg, dettur burtur.
5) Skotið verður upp at ásetingarnar í § 226, viðvíkjandi ósketni um tilstand ella aldur hjá órættaði, við ávísar broytingar verða fluttar í § 228.
6) Ásetingarnar í §§ 228 og 229 um medvirkan til prostitutión hjá øðrum verða við ymiskar broytingar fluttar í § 224, stk. 1 og §§ 233 og 234. Ásetingarnar í § 229, stk. 3-5, viðvíkjandi menn, sum búgva saman við ella lata seg uppihalda av einari kvinnu, sum livir av prostitutión, detta burtur.
7) Ásetingarnar í § 230, viðvíkjandi tann, sum tekur pornografiskar myndir, filmar ella tílíkt av persóni undir 18 ár, verða í síni heild flutt í §§ 226 og 227.
8) Ásetingin í § 231, um at revsing fyri brot á §§ 228 og 229 við endurtøka, kann hækkast við upp til tað hálva, verður strika.

*Til § 224*
Skotið verður upp, at gera eina nýggja áseting viðvíkjandi medvirkan til, at ein persónur undir 18 fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda. Hendan áseting verður sett í § 224, stk. 1. Verandi § 223 a, viðvíkjandi tann, ið sum kundi fyri gjald ella lyfti um gjald, hevur samlegu við persón undir 18 ár verður sett, sum § 224, stk. 2.
Sum nakað nýtt, fevnir ásetingin eisini um anal samlega (skal hetta útgreinast nærri?) millum persónar av ymiskum kyni og millum persónar av sama kyni. Aðrar kynsligar gerðir bæði millum persónar av ymiskum kyni og persónar av sama kyni vera fevndar av § 225 í revsilógina.

Galdandi §§ 224 og 225, viðvíkjandi aðrar kynsligar gerðir enn samlegu, verða flutt í § 225.

Skotið verður upp, at orða § 224, stk. 1 meinlíkt við § 227, stk. 1, viðvíkjandi medvirkan til, at persónur undir 18 ár er við í pornografiskari framførslu.

Sambært § 225, er § 224 eisini galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlega.

§ 224, stk. 1 fevnir sostatt um ein og hvør medvirkan til, at ein persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda, eisini føri har órættaði verður yvirtala, lokka, lumpa ella villeidd. Um harðskap ella annan ólógligan tvingsil sambært § 260 hevur verið nýtt, kann eisini revsast eftir § 216 í revsilógini.

§ 224, stk. 1 er undirløgd (subsidiær) § 262 a, stk. 2 viðvíkjandi menniskjahandil av persón undir 18 ár. Hinvegin kann revsast í samanstoytt millum § 224, stk. 1 og millum annað §§ 216, 222, 245 og 246.

Skotið verður upp, at revsiramman fyri brot á ásetingin verður sekt ella fongsul í upp til 6 ár.

*Til § 225*
Skotið verður upp, at leggja verandi ásetingar, viðvíkjandi aðrar kynsligar gerðir enn samlegu millum hinskynd í § 224 og kynsligt samband millum samkynd í § 225, saman í eina áseting viðvíkjandi aðrar kynsligar gerðir enn samlegu. Ásetingin verður sett í § 225. Í hesum sambandi verður eisini skotið, at § 221 í revsilógina, viðvíkjandi tann, sum sníkir seg til samlegu, eisini skal fevna um kynsligt samband millum hinskynd.

Ætlanin annars við at leggja §§ 224 og 225 saman í eina áseting, er at gera lóggávuna greiðari.

Framyvir fer "samlega" í § 216-224 tó eisini at fevna um anala samlegu (skal hetta greinast nærri?).
Burtursæð frá hesum, er ikki ætlanin at gera aðrar innhaldsligar broytingar í verandi rætt.

Tað er ikki ætlanin, at hetta uppskot, skal broyta metingin av hvussu grov anal samlega er í mun til vaginal samlega ella í mun til aðrar kynsligar gerðir. Tað er sostatt heldur ikki ætlanin, at broyta revsiásetingin í mál viðvíkjandi anal samlega í mun til verandi revsistøði.

*Til § 226*
Skotið verður upp, at flyta § 230, viðvíkjandi tann, sum tekur pornografiskar myndir, filmar ella tílíkt av persóni undir 18 ár, til § 226.

Ásetingin verður tó dagførd og stytt. Revsiramman, verður gjørd einfaldari, soleiðis at vanliga revsiramman uppá bót ella fongsul í upp til 2 ár verður løgd saman við herða revsiramman uppá fongsul upp í 6 ár. Tað er ikki ætlanin at gera innihaldsligar (gerningsindehold) broytingar ella broytingar í revsiásetingin í mun til í dag.

Uppreksingin, av herðandi umstøður í § 230, 2. pkt, dettur burtur. Umstøðurnar, vandi fyri lívinum hjá barninum, grovur harðskapur, álvarsaman skaða hjá barninum ella reguliga og skipaða útbreiðslu skulu tó framvegis vera herðandi umstøður við revsiásetingin. Aldur hjá órættaði fer eisini framvegis at hava týdning í samband við revsiásetingin, soleiðis at revsingin verður ásett strangar, tess yngri órættaði er. Um órættaði er yngri enn 15 ár, kann revsast í samanstoyt við § 216, stk. 2 ella § 222.
Sum nakað nýtt, verður skotið upp, at fyrningin, av brot á § 226, fyrst byrjar at renna, tá órættaði er fylt 21 ár, sí eisini viðmerkingar til broyting nr. 4.

*Til § 227, stk. 1*
Skotið verður, at gera eina nýggja áseting, viðvíkjandi pornografiskar framførslur har ein persónur undir 18 ár er við.
Verandi áseting í § 227, viðvíkjandi revsilækking ella revsiburtfall fyri brot á §§ 216-226 um gerningsmaðurin giftir seg við órættaði, dettur burtur. Hetta forðar tó ikki fyri, at tað eftir umstøðunum kann vera ein linnandi umstøða við revsiásetingin, at gerningsmaðurin og órættaði eru komin til sættis, og hava tikið samlívið uppaftur ella eru hildin áfram at liva saman.

Ásetingin er orða meinlíkt við § 224, viðvíkjandi medvirkan til, at persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda.
Sum grundregla fevnir § 227, um framførslur fyri áskoðarar, sum eru til staðar undir framførsluna. Pornografiskar framførslur fevnir eisini um striptease og onnur sløg av nakindansi.
Ásetingin fevnir í fyrstu syftu um framførslur, har gjaldast skal fyri at sleppa inn. Ásetingin fevnir tó eisini um til dømis framførslur, sum vera fyriskipaðar fyri eina avmarkaða nøgd av persónum uttan gjald. Ein treyt er tó, at framførslan í ein ávísan mun er fyriskipa frammanundan. Ásetingin er sostatt ikki galdandi fyri meira tilvildarligar framførslur. Dømi um hetta kundi vera, um ein persónur undir 18 ár, við eina privat veitslu, í kæti ger av at sýna fram striptease.

Um samlega og annað við ein persón undir 15 ár er part av framførsluni, kann revsast í samanstoyt við § 222 í revsilógini, viðvíkjandi samlega við persón undir 15 ár.

Brot á ásetingina er fyrst framt, tá ið ein persónur undir 18 ár luttekur við eina pornografiska framførslu. Um ein persónur undir 18 ár, luttekur í eina annars pornografiska framførslu, men framførslan hjá hesum ikki er pornografisk, kann ásetingin bert nýtast, um tað er tætt samband ella samanknýting ímillum ymisku táttarnir.
Roynd at fáa ein persón undir 18 ár at luttaka í eina pornografiska framførslu, kann framyvir revsast sum brotsroynd, um luttøkan verður av ongum.

Skotið verður upp, at revsiramman verður ásett til sekt ella fongsul í upp til 6 ár, sum samsvarar við ásetingin í § 224.

Hóast tað ikki er nevnt í ásetingina, eru hesa umstøður at rokna sum herðandi umstøður: Vandi fyri lívinum hjá barninum, grovur harðskapur, álvarsaman skaða hjá barninum ella meira regluligar og skipaðar framførslur. Aldur hjá órættaði hevur eisini týdning í samband við revsiásetingin, soleiðis at revsingin verður ásett strangar, tess yngri órættaði er. Um órættaði er yngri enn 15 ár, kann revsast í samanstoyt við § 216, stk. 2 ella § 222.

*Til § 227, stk. 2.*
Hendan ásetingin viðvíkur áskoðarar til pornografiskar framførslur har ein persónur undir 18 ár luttekur. Ásetingin viðvíkur bert tilætla brot, og áskoðarin skal sostatt verða greiður yvir, ella meta tað sum munandi sannlíkt, at ein persónur undir 18 ár luttekur í framførsluni.
Ásetingin fevnir sostatt ikki um tann, sum er áskoðari til eina pornografiska framførslu, og ikki er greiður um, at ein persónur undir 18 ár luttekur. Um viðkomandi undir eina framførslu verður greiður yvir, at ein persónur undir 18 ár luttekur, er møguligt at nýta ásetingin um viðkomandi heldur áfram at vera áskoðari til framførsluna.
Ásetingin viðvíkur "áskoðarar" til pornografiskar framførslur, tað vil siga persónar, sum koma har, fyri at síggja hesar somu framførslur. Persónar sum av tilvild koma á staðið eru ikki fevndar av ásetingina, uttan so at tey vera verandi, sum áskoðarar.

Skotið verður upp, at revsiramman verður ásett til sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

*Til § 228*
Skotið verður upp, at flyta § 226, um ósketni viðvíkjandi tilstandin ella aldurin hjá tí órættaði í samband við brot á § 216, stk. 1, nr. 2, §§ 218 ella 222-224, § 225 sbrt. § 216, stk. 1, nr. 2, §§ 218 ella 222-224, § 226 ella 227, stk. 1, til § 228, við ávísum broytingum.

Verandi § 228, verður flutt til § 233, við onkrar broytingar, sí viðmerkingar til hendan áseting.

Skotið verður upp, at víðka øki fyri ósketni í mun til aldur hjá órættaði, til at eisini at fevna um medvirkan til, at persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda í § 224, stk. 1 og medvirkan til, at ein persónur undir 18 ár er við í pornografiskari framførslu í § 227, stk. 1.

Skotið verður eisini upp, at ósketni viðvíkjandi aldur hjá órættaði, framyvir ikki skal verða revsivert í samband við tær ásetingar, ið herða revsingina, og sum eisini hava eitt aldursmark. Tær ásetingar, ið talan er um, er § 216, stk. 2, viðvíkjandi samlegu við barn undir 12 ár og § 220, viðvíkjandi grov misnýtsla av annans arbeiðsliga, fíggjarliga, viðgerðarliga ella røktarliga tørvi.
Í føri, har talan er um ósketni viðvíkjandi aldur í tílíkar ásetingar, ið herða revsingina, vil málið ístaðin skula revsast sum eitt tilætla brot innan vanligu revsirammuna. Í hesum sambandi virkar § 216, stk. 2 sum ein herðing av revsingini í mun til § 222 í revsilógina. Samlega við barn undir 12 ár, har gerningsmaðurin ikki hevur havt tilætlan viðvíkjandi tí, at barnið er undir 12 ár, vil sostatt skula revsast eftir § 222.

*Til § 232*
Skotið verður upp, at orða ásetingin einklari. Tað er tó ikki ætlanin, at gera nakra broyting í brotsgerðin.

Uppskotið, um at víðka verandi § 218, stk. 2, sum í hesum uppskotið er § 216, stk. 1, nr. 2, til eisini at fevna um støður, har órættaði ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini, ber í sær, at tílík støða ikki longur er fevnd av § 232, viðvíkjandi blúnisbrot.

Skotið verður upp, at býta revsiramman upp í tvey, eina vanliga revsirammu, sum er sekt ella fongsul í upp til 2 ár, og eina herða revsirammu, sum fevnir um blúnisbrot framt móti barn undir 15 ár. Revsiramman í hesum føri er sekt ella fongsul upp í 4 ár.

Tað er ikki ætlanin at broyta revsiásetingina í mun til í dag.

Í hesum sambandi skal tó viðmerkjast, at tað framvegis verður ein herðandi umstøða, um blúnisbrotið er framt við, at gerningsmaðurin hevur gjørt sær dælt av síni kropsligu ella sálarligu yvirvág.

Skotið verður upp, at fyrningin av revsiábyrgd fyri blúnisbrot framt móti barn undir 15 ár, fyrst byrjar at renna, tá ið órættaði er fylt 21 ár.

*Til § 233*
Skotið verður upp, at seta inn í § 233 eina áseting viðvíkjandi ruffarí og aðra misnýtslu av og millumgonguvirksemi (mellmmandsvirksomhed) við prostitution hjá øðrum. Harafturat verður skotið upp at innseta eina áseting viðvíkjandi útleigan av rúm á gistingarhúsið til vinnulig prostitutión.

Galdandi § 233 viðvíkjandi eggjan og innbjóðing til prostitutión og annað verður strika.

Uppskotna § 233, stk. 1, førir víðari galdandi § 228, stk. 1, nr. 3, um at halda bordell og partar av § 229, stk. 1 um millumgonguvirksemi (mellemmandsvirksomhed) og misnýtsla av prostitutión hjá øðrum. Uppskotna § 233, stk. 2 førir víðari hinar ásetingarnar í § 229, stk. 1 um misnýtsla av og millumgonguvirksemi (mellemmandsvirksomhed) við prostitutión hjá øðrum. Uppskotna § 233, stk. 3 førir víðari galdandi § 229, stk. 2.
Skotið verður upp, at § 229, stk. 3, um menn, sum lata seg uppihalda av einari kvinnu sum er prostituera, § 229, stk. 4, um menn, sum búgva saman við einari kvinnu sum er prostituera og § 229, stk. 5 um undantak frá hesum ásetingum fyri dreingir undir 18, sum kvinnan hevur uppihaldsskyldu fyri, vera strika. Tað er ikki í trá við nútímanssamfelagið og nútímans hugsunarhátt, at ein prostituera ikki skal kunna búgva saman við einum manni og partvíst uppihalda honum, um hetta ikki hevur nakað við prostitutión at gera. Tá talan er um verju móti ruffarí og millumgonguvirksemi er hetta ásett í § 233, stk. 1 og 2.

Uppskotna § 233, stk. 1 viðvíkur tann bakmann, sum rekur vinnu, við at ein annar fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda.

Ásetingin kann ikki nýtast, um ein persónur rekur vinna við sjálvur, fyri gjald ella lyfti um gjald at hava kynsligt samband við kunda.

Ásetingin kann heldur ikki nýtast, um fleiri persónar í felag reka vinnu, við fyri gjald ella lyfti um gjald at hava kynsligt samband við kunda, soleiðis at tey býta útreiðslurnar millum sín.
Ásetingin vil tó kunna nýtast, um ein av teimum prostitueraðu virkar sum leiðari í mun til hini ella fær ein part av vinninginum frá hinum prostitueraðu, uttan at tað er talan um at býta útreiðslur. Ásetingin kann eisini nýtast, um virki verður stýrt av einum persóni, sum ikki arbeiðir sum prostituera í virkinum.

Um ásetingin verður nýtt, móti einum persóni, sum sjálvur arbeiðir sum prostituera í virkinum, vil vinningin viðkomandi sjálv hevur forvunnið sum prostituera, vera forvunnin á ikki revsiverdan hátt. Hald kann tískil ikki leggjast á vinninginum eftir § 75, stk. 1 í revsilógina.

Sambært ásetingin í stk. 1 skal persónurin “reka vinnu”. Hetta ber í sær, at virksemi skal hava eina ávísa stødd og eitt ávíst reglusemið, áðrenn ásetingin kann nýtast. Hinvegin er einki krav um, hvussu nógv virksemi hvør einstøk prostitutera skal hava í virki. Eisini eitt einstakt kynsligt samband við ein kunda fyri gjald ella lyfti um gjald er fevnt av ásetingini, um samlaða virksemi hjá bakmanninum hevur eina slíka stødd, at viðkomandi má sigast at “reka vinnu” við prostitutión hjá øðrum.

Hóast hetta, skal ikki nógv til, fyrr enn talan er um at “reka vinnu”. Eisini “frítíðarvirksemi” sum bakmaður fyri prostitutión hjá øðrum er fevnt av ásetingini. Til dømis vil virksemi, sum ber í sær, at 1-2 prostituteraðar umleið aðru hvørja viku fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við nakrar fáar kundar, vera fevnt av ásetingini.

Viðvíkjandi prostitutiónvirksemi, sum verður rikið frá ávís hølið, har kundar kunna venda sær og fáa kynsligt samband á staðnum (bordell virksemi) samsvarar uppskotna § 233, stk. 1 til galdandi áseting í § 228, stk. 1, nr. 3 um at "halda bordell".

Uppskotna ásetingin fevnir tó eisini um allar aðrar mátar at reka prostitutión, bert talan er um, at ein persón rekur vinnu, við at annar fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda. Sum dømi kunnu nevnast barprostitutión, escortprostitutión og gøtuprostitutión.

Ásetingin viðvíkur tann (bakmaðurin), sum rekur vinnu, tað vil siga tann sum ræður fyri raksturin av virkinum. Hetta er galdandi, óansæð um viðkomandi er á virkinum dagliga ella letur onnur reka virki fyri seg. Sum nevnt omanfyri, kann ein bakmaður sjálvur arbeiða sum prostituera í virkinum. Tað er heldur ikki óhugsandi, at fleiri persónar í felag, kunnu hava ræði yvir raksturin í prostitutión virkinum og at øll tí eru beinleiðis fevnd at ásetingini.

Harafturat kemur, at nýggja § 233, stk. 1 sambært § 23 í revsilógina um medvirkan, fevnir um øll, sum við eggjan ella stuðlan hava medvirka til brotið.

Hóast hetta, kunnu teir persónar, sum eru nevndir í gerningsinnihaldi, tað vil siga lutvíst tann prostitueraði (annar) og lutvíst kundin (kunda), ikki revsast fyri medvirkan fyri brot á ásetingini, tá tey sum lýst í ásetingini, sum ávikavist seljari og kundi hava kynsligt samband fyri gjald ella lyfti um gjald.

Hetta fylgir eisini av tey verndarfyrilit, sum liggja aftanfyri ásetingini, nevniliga at verja tey prostitueraði ímóti at vera misnýtt av einum bakmanni. Tað vil siga at prostitueraði, ið arbeiða í hetta sama prostitutións virki, sum meginregla ikki eiga at revsast fyri medvirkan til at reka prostitutiónsvirki.

Tá drigið verður samanum, ber hetta í sær, at tá ein bakmaður rekur vinnu við prostitutión, kunnu teir persónar, sum hjálpa honum, revsast fyri medvirkan. Hetta er galdandi bæði fyri persónar, sum leiga út hølið ella lata vørur ella tænastuveitingar, sum til dømis lýsingar ella gjaldstænastur, til prostitutión virki og persónar, sum uttan at vera prostitueraði, arbeiða á virki, sum til dømis vaktarmenn, bilførarir, telefonfólk, móttøkufólk og annað. Fyri øll tey medvirkandi er tað galdandi, at revsing er treyta av tilætlan, eisini í mun til at talan er um at reka vinnu við, at ein annar fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda. Í hesum sambandi skal eisini vera tilætlan um, at prostitutiónsvirki verður rikið av einum bakmanni og ikki av teimum prostitueraði í felag.

Sum heild eigur ein prostituera bert at vera revsa fyri medvirkan, um viðkomandi hevur eitt leiðandi starv í mun til hinar prostitueraðu.

Ásetingin er galdandi óansæð um bakmaðurin hevur fingið vinning ella hevði ætlanir um at fáa vinning. Endamálið við ásetingini er tó, at verja prostitueraði móti misnýtslu, undir hesum goymda misnýtslu. Um ein bakmaður hendingaferð hvørki hevur fingið vinning ella hevði ætlanir um at fáa vinning, so talar hetta fyri ein mildari revsing enn annars.

Skotið verður upp, at varðveita galdandi revsiramma fyri ruffarí uppá fongsul í upp til 4 ár. Tað er ikki ætlanin at gera broytingar í revsiásetingin fyri brot á § 228, stk. 1, nr. 3 í mun til í dag.

Viðurskifti sum í dag bert verða revsa sum misnýtslu av annans arbeiði sum prostituera, sí galdandi áseting í § 229, stk. 1, eiga tó, tá talan er um ruffarí, sum lýst í § 233, stk, framyvir at revsast á sama hátt sum bordell virksemi. Ítøkiliga revsingin eigur millum annað at ásetast í mun til hvussu leingi prostitutiónsvirksemi er farið fram, hvussu nógvar prostitueraðar arbeiða fyri viðkomandi og tann fingna ella tilætlaða vinningin, men tá viðurskiftini annars kunnu samanberast eigur bakmansvirksemi í samband við barprostitutión, escortprostitutión og gøtuprostitutión at vera revsa eins hart sum bakmansvirksemi í samband við bordellvirksemi.

Tað kann revsast í samanstoyt millum uppskotna § 233, stk. 1 og uppskotna § 224, stk. 1 um medvirkan til, at ein persónur undir 18 fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda.

§ 233, stk. 2, 1. pkt. viðvíkjandi tann sum uppá aðramátar ger sær dælt av, at onkur við vinnuligum endamáli hevur kynsligt samband við kunda førir víðari § 229, stk. 1, 2. lið. Tað er ikki ætlanin at gera nakra broyting í gerningsinnihaldi.

Ásetingin fevnir framvegis bert um tann, sum ger sær dælt av annans vinnuliga prostitutión. Hetta fevnir eisini um prostitutión sum hjávinna. Viðmerkjast skal, at tað at gera sær dælt av prostitueraði undir 18 ár er fevnd av § 224, stk. 1, sum er galdandi fyri bæði vinnuligan og ikki vinnuligan prostitutión.

“At gera sær dælt av” skal skiljast sum at ávirka tann prostitueraða til meira varandi at geva ein part av vinningin víðari uttan at móttakarin hevur eitt rættarkrav ella eitt natúrligt krav uppá hetta. Tílík ávirkan vil eftir umstøðunum kunna fara fram tigandi, men óvirkin (passiv) móttøka av einum parti av vinninginum hjá einum prostitueraðum er ikki fevnd av brotið. Um tann prostitueraði rindar ein munandi hægri prís fyri eina tænastu enn onnur skulu rinda, ella sum í aðramátar má metast vanlig ella rímilig, er hetta eisini talan um at gera sær dælt av prostitutión hjá øðrum. Dømi um hetta kann vera leigu av høli til yvirprís.

Tá talan ikki er um tvingsil, svik ella annan ósømiligan ávirkan er tað loyvt at taka ímóti uppihaldspengar frá einum prostituera, sum tann prostitueraða er plikta at veita (hjúnafelagið og børn) ella tá tað tó eftir vanlig fatan er ein natúrlig skylda (til dømis sambúgvi, foreldur ella systkin, treyta av umstøðunum annars). Í tílík føri er sostatt til dømis loyvt, at ein sambúgvi hjá einum prostitueraðum verður uppihildin av hendan, ella at ein ikki sambúgvandi drongur/genta fær vanligar gávur.

Um ivamál er, má ein ítøkilig meting gerast um sambandi millum partarnar. Viðmerkjast skal, at ásetingin krevur tilætlan, herímillum viðvíkjandi at fíggjarliga fyrimunin er fíggja við prostitutión hjá gevaranum.

§ 233, stk. 2, 2. pkt. viðvíkjandi tann, ið sum millummaður í fleiri endurtakandi førum ella við vinningi fyri eyga fremur, at annar fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda førir víðari § 229, stk. 1, 1. lið um millummansvirksemi. Tað er ikki ætlanin at gera nakra broyting í gerningsinnihaldi.

Skotið verður upp, at revsiramman fyri brot á § 233, stk.2 verður sekt ella fongsul í upp til 3 ár. At sekt er við í vanliga revsiramman og ikki bert í blíðkandi førum, er fyri at gera revsiramman einklari. Ætlanin er ikki at broyta vanliga revsistøði higartil eftir § 229, stk. 1.

§ 233, stk. 3 viðvíkjandi leigu av rúm á gistingarhúsið førir víðari § 229, stk. 2. Ásetingin er málsliga dagførd, men tað er ikki ætlanin at gera nakra broyting í gerningsinnihaldi.

Skotið verður upp, at revsiramman fyri brot á § 233, stk. 3 verður sekt ella fongsul upp í 1 ár. At sekt er við í vanliga revsiramman og ikki bert í blíðkandi førum, er fyri at gera revsiramman einklari. Ætlanin er ikki at broyta vanliga revsistøði higartil eftir § 229, stk. 2.
Galdandi § 228, stk. 1, nr. 1 verður dagførd førd víðari í § 234.

Galdandi § 228, stk. 1, nr. 2 um fyri vinning at lokka nakran til prostitutión ella halda nakran, sum rekur vinnu við prostitutión, frá at halda uppat, verður ikki førd víðari.
Ásetingin er tikin upp í § 262 a um menniskjahandil.

Galdandi § 228, stk. 2 um at eggja ella hjálpa einum persóni undir 18 ár til at reka vinnu við prostitutión verður førd víðari í § 224, stk. 1. Restin av ásetingin verður førd víðari í § 262 a um menniskjahandil.

*Til § 234*
Skotið verður upp, í § 234, at seta eina áseting, um at fremja prostitutión hjá øðrum við ósømiligan atburð.

Verandi § 234 verður flutt til § 235 fyri at skipa lógina greiðari. Samstundis verður ásetingin broytt og dagførd, so hon passar betur til nútímans samfelagið. Sí nærri undir viðmerkingar til § 235.

Í nýggja § 234 verður ásett, at tann sum við ólógliga at skapa, styrkja ella gera sær dælt av villleiðing, ella á annan ósømiligan hátt fær annan persón til fyri gjald ella lyfti um gjald at hava kynsligt samband við kunda, verður revsaður.

Ásetingin er flutt úr verandi § 228, stk. 1, nr. 1, viðvíkjandi at lokka ein persón til prostitutión, men við meira nútímans orðing.

Ásetingin er undirløgd (subsidiær) § 262 a, viðvíkjandi menniskjahandil og nýggja § 224, stk. 1 viðvíkandi medvirkan til, at persónur undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur samlegu við kunda.
Ásetingin fer tí í royndum at vera nýtt í teimum førum, har órættaði er yvir 18 ár, og talan ikki er um at misnýta viðkomandi.

Ásetingin viðvíkur tann, sum við sviki ella á annan ósømiligan hátt fær ein annan persón til fyri gjald ella lyfti um gjald at hava kynsligt samband við kunda. Brotsinnihaldi "ólógliga at skapa, styrkja ella gera sær dælt av villleiðing" og "annan ósømiligan hátt" skal skiljast uppá sama máta sum ásetingarnar í § 262 a, stk. 1, nr. 4 og 5.

Ásetingin tekur ikki við "ólógligan tvingsil sbrt. § 260", "frælsisskerjing sbrt. § 261" ella "hóttanir sbrt. § 266". Orsøkin til hetta er, at um ólóglig tvingsil verður nýtt til at fáa onkur til kynsligt samband, kann revsast fyri neyðtøku eftir tí nýggja § 216. Sama vil ofta vera galdandi um frælsisskerjing ella hóttanir vera nýtt at fáa onkur til kynsligt samband, tí hetta vil ofta samstundis vera ólógligan tvingsil. Í teimum førum har hetta ikki er galdandi, vil tað kunna revsast fyri frælsisskerjing ella hóttanir. Hesar ásetingar hava hægri ella sama revsiramma sum fyri § 234.

Skotið verður upp, at revsiramman fyri brot á § 234 verður sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

*Til § 235*
Ásetingin er flutt úr § 234 og viðvíkur:

1) tann, sum bjóðar ella letur einum persóni undir 18 ár ónæriligar bøkur ella rit, myndir ella lutir
2) tann, sum almannakunngerð ella breiðir út ella við tilíka ætlan ger ella flytur inn ónæriligar bøkur, rit, myndir ella lutir og
3) tann sum skipar fyri almennan fyrilestur, framførslu ella framsýning við ónæriligum innihaldi.

Í stk. 2 er ein áseting við herd revsing, um viðkomandi hevur framt brotið við vinnuligum endamálið.

Skotið verður upp, at broyta og dagføra ásetingarnar, so tær vera meira í trá við nútímans hugburð.

Ásetingarnar í § 235 eru komnar í revsilógina í 1930 og eru sostatt merktir av at vera gjørdar í eina aðra tíð.

Ætlanin er ikki at frígeva pornografi, men at gera nakrar tillagingar.

Orðið "ónærðiligar" verður nýtt í áseting nr. 1 í staðin fyri "pornografiskar" sum hinvegin verður nýtt í áseting nr. 2 og 3. Talan er í hesum førinum um at verja børn, og tí skal hugtakið her eisini skiljast smalri, enn í hinar ásetingarnar.
Markið fyri nær nakað annars má metast at vera pornografiskt, er tætt tengt at tí tíð vit liva í. Tað verður tí latið upp til dómsvaldið at avgera nær farið verður útum hetta mark.

Í nr. 1 verður skotið upp, at strika bøkur og skriftir úr ásetingini. Hetta tilfar er sera lætt, at fáa atgongd til á internetið og samstundis er tílíkar bøkur blivi alt vanligari í bókhandlum og á bókasøvnum. Hinvegin verður forboðið móti ónæriligar myndir, filmar og lutir varðveitt.
Samstundis verður eisini skotið upp, at forboðið bert skal fevna um tilfar sum verður selt ella latið einum persóni undir 18 ár.

Skotið verður upp, at varðveita ásetingin í nr. 2, tó bert viðvíkjandi beinleiðis pornografiskt tilfar.

Viðvíkjandi nr. 3 verður skotið upp at strika almennar fyrilestrar og framsýningar úr ásetingini, meðan pornografiskar framførslur framvegis vera forbodnar.

Almennar fyrilestrar við kynslívsfrøðiligum innihaldi eru vorðnar alt meira vanligar, og enntá kringvarpssendingar við tílíkum innihaldi eru vorðnar væl dámdar. Tað tykist tí vera ímóti tíðarandan, at forbjóða tílíkar fyrilestrar, sum møguliga kunnu vera á markið fyri at vera brot á verandi § 235, stk. 1, nr. 3. Nakað tað sama er galdandi viðvíkjandi framsýningar, har tað listarliga kann verjast at vísa naknar mannakroppir.

Skotið verður upp, at revsingin fyri brot á § 235 verður sekt.

*Til § 236*
Ásetingin er flutt úr § 235 fyri at skipa lógina greiðari.

Skotið verður upp, at orða undantakið í stk. 3 frá at kunna hava pornografiskt tilfar í hond av persóni sum er fylt 15 ár, á nýggjum.
Orðingin staðfestir at undantakið fevnir um tað sama sum forboðið í stk. 2. Samstundis verður undirstrika, at undatakið er galdandi, tá ið viðkomandi samtykkir til, at ein kann hava tilfarið í hondum. Í hesum liggur, at samtykki til eina og hvørja tíð kann takast afturvið tí virkna, at um onkur framvegis hevur tilfarið í hondum, so er hetta fevnt av forboðið í § 236, stk. 2.

Av tí at tilætlan krevst, vil revsing fyri at hava tilfarið í hondum eftir at fyrr givið samtykki er kalla aftur, krevja at gerningsmaðurin hevur tilætlan, viðvíkjandi at samtykki er kalla aftur. Hóast samtykki sum meginregla, vil kunna kallast aftur tigandi, er tað mest sannlíkt, at vegna prógv, vil revsing bert koma uppá tal, um samtykki er staðiliga kalla aftur. Hetta er eisini galdandi í sambandi við samveruslit og endan á einum parlagi, har revsing fyri framvegis at hava pornografiskt tilfar í hondum, krevur, at viðkomandi staðiliga hevur biðið gerningsmaðurin oyðileggja tilfarið.

*Til § 237*
Skotið verður upp at dagføra ásetingarnar um treytir í samband við dóm fyri summi sløg av kynslig brotsverk.

Ásetingin verður skipað soleiðis, at:
- Í stk. 1 verða tær revsiásetingar, har treytir kunnu ásetast við dóm uppreksaðar. Síðani vera tey ymisku sløgini av treytum lýstar.
- Í stk. 2 verður ásett hvørji undantøk eru til stk. 1.
- Í stk. 3 verður ásett í hvørjum førum dóm við treytum kann nýtast.
- Í stk. 4 verður lýst hvussu leingi eitt forboð kann galda.
- Í stk. 5 verður ásett, at forboð ikki má vera í ósamsvari við tað ólag, sum tað skapar hjá tí dømda.
- Í stk. 6 verður ásett í hvørjum førum dømdi kann krevja, at fáa rættin at taka støðu til, um forboðið skal standa við.
- Í stk. 7 verður revsing fyri brot á forboðið ásett.

Tey brot sum kunnu viðføra dóm við treytum eru:
- Neyðtøka (§ 216)
- Kynsligt samband við barn undir 15 ár (§ 222)
- Kynsligt samband við persón undir 18 ár við grovlig misnýtsla av yvirvág í aldri ella royndum (§ 223, stk. 2)
- Medvirkan til at persón undir 18 ár fyri gjald ella lyfti um gjald hevur kynsligt samband við kunda (§ 224, stk. 1)
- Blúnisbrot (§ 232)
- Menniskjahandil av persón undir 18 ár (§ 262 a, stk. 2)

Treytirnar sum kunnu gevast við dóm fyri hesi brot, eru tilhaldsforboð, bústaðarforboð, vitjanarforboð og kontaktforboð.

**Tilhaldsforboð** eftir § 237, stk. 1, nr. 1 ásetir at forboð kann setast fyri at vera ella ferðast á einum neyvari ásettum øki við gerningsstaðið. "At vera" ella "ferðast á" skal skiljast á sama hátt, sum í lóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing. Hetta fevnir um ein og hvør likamlig hjávera á viðkomandi staðnum, herundir at fara tvørturum staðið. Eitt tilhaldsforboð merkir sum grundregla, at øll hjávera á staðnum er eitt brot, hóast talan er um stutta hjáveru. Eitt tilhaldsforboð ber sostatt eisini í sær, eitt forboð móti at seta búgv á staðnum.

Tað landfrøðiliga staðið sum tilhaldsforboðið fevnir um, skal lýsast so neyvt sum tilber í dóminum, til dømis við kort yvir staðið. Orðingin "við gerningstaðið" skal skiljast í mun til at talan er um eitt munandi inntriv í rásarúmi hjá viðkomandi, og tí vanliga eigur at vera eitt minni øki við gerningstaðið. Tað er tó eingin avmarking fyri hvussu stórt øki kann vera, og metast má tí um, um avmarkingin er í samsvar við tað ólag, sum tað skapar hjá tí dømda.

Uppskotna ásetingin er í summum førum víðari einn galdandi áseting, við tað at ásetingin ikki er avmarka til serlig sløg av støðum. Hinvegin er ásetingin meira avmarka, tí tilhaldsforboðið er knýtt at eitt ásett øki við gerningsstaðið. Hetta er ikki eitt krav við galdandi áseting.

**Bústaðarforboð** eftir § 237, stk. 1, nr. 2 ásetir at dømdi ikki uttan loyvi frá løgregluni, má lata børn undir 18 ár halda til á bústaði sínum, ella sjálvur halda til hjá persónum, har sum børn undir 18 ár búgva. Eitt tílikt forboð fevnir tó ikki um børn ella ættleidd børn hjá viðkomandi sambært § 237, stk. 2.

Bústað skal í hesum sambandi skiljast breitt, og fevnir til dømis eisini um fyribils bústað, sum frítíðaríbúð og kann eisini vera til dømis ein kampingvognur, ein bát ella eitt telt. Hugsa verður í fyrstu syftu um tað stað, har viðkomandi liggur nátt.

Við orðingin "halda til" verður eisini hugsa um at viðkomandi liggur nátt, og vanliga vil kravið vera, at talan er um fleiri nættur. Eitt bústaðarforboð vil tí ikki vera til hindur fyri, at ein floksfelagið hjá eitt barn í húski hjá dømda, liggur nátt á bústaðið hjá dømda ella at dømdi í samband við eina veitslu liggur nátt hjá familju, ið hevur heimabúgvandi børn. Um til dømis serbarn hjá sambúgvi hjá dømdi í samband við samveru liggur nátt til dømis annað hvørt vikuskifti ella dømdi er 3-4 jóladagar hjá familju, við børnum, krevur hetta loyvi frá løgregluni.

Eitt bústaðarforboð er heldur ikki til hindurs fyri, at dømdi í dagtímarnar er saman við einum barnið, um tey bert ikki liggja nátt á sama bústaðið.

Eitt bústaðarforboð ber í sær, at dømdi ikki uttan loyvi frá løgregluni má deila bústað við eitt barn.

Lagt verður til grund, at løgreglan vanliga gevur loyvi, um dømdi samtykkir í, at løgreglan kunnar foreldrini hjá viðkomandi barnið (tað vil siga tann/tey sum hava foreldramyndugleikan) um dómin, sum hevur givið bústaðarforboðið.

Um ein, sum hevur foreldramyndugleikan, er í eina støðu, har viðkomandi ikki er førur fyri at skilja kunningina, ella um løgreglan, hóast rímuligar royndir, ikki eru komin í samband við ein av teimum, sum hevur foreldramyndugleikan, kann kunningin gevast til hin, sum hevur foreldramyndugleika. Um barnið er sett uttanfyri heimi, eigur kommunan vanliga at kunnast um dómin. Tað vil kunna setast sum treyt fyri at geva loyvi, at kommunan samtykkir í hesum.

Samtykki frá dømdi ber í sær, at løgreglan kann kunna foreldrini hjá barninum um allan dómin, tó ikki um persónsnummar og upplýsingar, sum eru í trúnaði vegna aðrar persónar enn dømdi. Tað er løgreglan sum má meta um, hvussu stóran part av dóminum, foreldrini skulu kunnast um. Kunnast skal í hvussu er um, hvør dómstólur hevur felt dóm, hvat dag dómur er fallin, niðurstøða og tey viðurskifti, sum tað í høvuðsheitum er dømt fyri.

Í mun til galdandi áseting, er tað nakað nýtt, at løgreglan kann geva undantaksloyvi frá ásetingingi um at lata børn undir 18 ár halda til á bústaðnum hjá viðkomandi.

**Vitjanarforboð** eftir § 237, stk. 1, nr. 3 ásetir, at tann dømdi ikki má fáa vitjan av børnum undir 18 ár, tá ið ein vaksin ikki er við. Ásetingin viðvíkur tilburðir, har dømdi fær vitan av einum barni. Vitjanarforboðið er ikki til hindurs fyri, at aðrar persónar í húskinum, undir hesum børn, kunnu fáa vitjan av einum barnið, ið ikki hevur ein vaksnan persón við. Tað er tó ein treyt, at hin persónurin í húskinum er til staðar, meðan barnið vitjar. Um dømdi er einsamallur heima, vil einhvør vitjan, tá ið ein vaksin ikki er við, vera brot á vitjanarforboðið. Hinvegin eru vitjanir sum bert henda, meðan dømdi ikki er tilstaðar, ikki i stríð við vitjanarforboðið, hóast barnið er bjóða av dømdi, og tað ikki eru aðrar persónar heima.

Vitjunarforboðið er heldur ikki til hindurs fyri, at dømdi sjálvur fer at vitja eitt barn.

Vitjan fevnir um tey føri, tá ið vitjanin ikki er so long, at talan er um at "halda til" sambært nr. 2. Vitjan fevnir eisini um tey føri, tá ið dømdi uttan fyri sítt bústað, til dømis á eini matstovu ella í býnum er vertur fyri eitt barn, sum ikki hevur ein vaksnan við. Vitjan fevnir ikki um tey føri, tá ið dømdi og eitt barn hittast, uttan at dømdi kann sigast at vera vertur fyri barnið.

Vitjan fevnir eisini um tey føri, tá ið barnið kemur á bústaðin hjá dømda vegna arbeiði, undir hesum tá barnið er í starv hjá triðimanni til dømis einum handverkara, ella kemur við ella eftir onkrum. Í slíkum førum er neyðugt, at barnið hevur ein vaksnan við ella at dømdi ikki er heima, um barnið verður verandi í meira enn nakrar heilt fáar minutir.

Vitjan fevnir hinvegin ikki um, at eitt barn er í starv á virki hjá tí dømda, uttan at talan er um at gera arbeiði á bústaðin hjá dømda, ella ein støða har dømdi meira er vertur enn arbeiðsgevari fyri barnið. Dømi um hetta kann vera, at dømdi bjóðar barnið at vera verandi á virkinum eftir lokin arbeiðsdagur. Tílíkt vil vera brot á vitjunarforboðið, um barnið ikki hevur ein vaksnan við.

Ásetingin sigur einki um, hvussu leingi barnið skal vera hjá tí dømda, áðrenn talan er um eina vitjan. Eisini heilt stutt hjávera t.d. 5-10 minuttir er ein vitjan í mun til ásetingin. Ein heilt stutt hjávera til dømis 2-3 minuttir fyri at geva ella fáa eini boð, ella fyri at koma við ella eftir onkrum verður tó ikki mett at vera ein vitjan í mun til ásetingin.
Hjávera av einum barnið hjá dømda, vil altíð vera ein vitjan, óansæð um tann dømdi ella barnið hevur tikið stig til vitjanin, og óansæð um vitjanin var løgd til rættis áðrenn ella barnið kemur óvæntað á vitjan. Um barnið sjálvt er farið inn til dømda, er tað tó ein treyt, at dømdi hevur góðtikið hjáveran hjá barninum ella ikki hevur tikið rímulig stig til at enda hjáveruna.

Tað er bert um barnið ikki hevur ein vaksnan við, at vitjanin er í stríð við vitjanarforboðið. At barnið hevur ein vaksin við, merkir at tann vaksni skal vera til staðar meðan barnið vitjar tann dømdi. Tað er ikki nokk at ein vaksin kemur við ella heintar barni. Tað er tó ikki eitt krav, at tann vaksni er saman við barnið alla tíðina meðan vitjanin fer fram. Hvat krevst hongur saman við ítøkiligu umstøðurnar. Um nógv børn og vaksin eru til staðar, vil tað kunna vera longri tíðarskeið barnið ikki er saman við tí vaksna, enn um bert eitt barn er til staðar. Í mun til endamálið við forboðið, vil tað heldur ikki vera nakað til hindurs fyri, at tann vaksni undir vitjanin alla tíðina ella næstan alla tíðina er saman við tí dømda, meðan barnið er einsamalt saman við onnur børn ella vaksin.

Tað ber ikki til hjá løgregluni, at geva undantaksloyvi frá vitjanarforboðið.

Í mun til galdandi áseting, er tað nakað nýtt, at tað framvvir verður ein serstakur møguleiki fyri at geva vitjanarforboð.

**Kontaktforboð** eftir § 237, stk. 1, nr. 4 ásetir at tann dømdi ikki gjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar má royna at fáa kontakt við børn undir 18 ár, tá tey ikki kenna dømdi frammanundan. Avmarkingin til børn, ið ikki kenna dømdi frammanundan, kemst av atliti til at dømdi til dømis eigur at kunna senda teldupost, skypa ella tjatta við børn, sum tann dømdi er komin at kenna uttan at nýta internet, til dømis børn hjá vinum ella familju. Avmarkingin skal sostatt skiljast soleiðis, at um tann dømdi, í stríð við kontaktforboðið, gjøgnum internetið er komin at kenna eitt barn, vil samband gjøgnum internetið framvegis vera brot á kontaktforboðið, so leingi tann dømdi og barnið ikki beinleiðis hava hitt hvønn annan. Avmarkingin skal eisini skiljast soleiðis, at barnið ikki kennir viðkomandi í mun til ásetingin, um barnið ikki kennir sanna samleikin hjá dømda. Tað er tó ikki eitt krav, at barnið skal kenna fulla navn ella neyva adressu, fyri at tað verður mett at barnið kennir dømda.

Afturat kontakt gjøgnum internetið fevnir ásetingin um kontakt gjøgnum aðra tílíka skipan til at breiða út upplýsingar. Hetta er tikið við, fyri at framtíðartryggja ásetingin í mun til framtíðar samskiftistøkni sum líkist internetið.

Kontakt gjøgnum internetið fevnir um eitthvørt samband, bæði skrivligt og munnlig, har internetið verður nýtt. Dømi um hetta er teldupost, internet tjatt, og samskifti við internettelefon. Samskifti við til dømis Facebook er eisini fevnt av ásetingini. Telefonsamskifti og framsending av tekst- ella myndaboð har telefonnetið verður nýtt, er hinvegin ikki fevnt av ásetingini.

Kontaktforboð er eisini galdandi, hóast barnið tekur fyrsta stigi til samband, til dømis sendir fyrsta teldupost ella fyrsta tjatt boðið. Í tílík føri má dømdi lata vera at svara.

Kontaktin skal vera vend móti eitt ella fleiri ítøkilig børn ella meira alment móti børnum fyri at vera fevnd av forboðnum. Ein almenn áheitan á til dømis Facebook vangan hjá tí dømda ella ein annan, sum er vend bæði móti børnum og vaksnum, er ikki fevnd av forboðnum.

Tað er brot á kontaktforboðið um dømdi, til dømis sendir ein teldupost ella leggur eini boð á ein tjatt vanga ella Facebook vangan við tilætlan um at fáa samband við eitt barn. Tað vil sostatt vera fullgjørt brot á kontaktforboðið, hóast teldupostin ella boðini ikki eru komin fram til nakað barn.
Viðmerkjast skal, at brotsroynd eftir § 237 í revsilógina ikki er revsivert sambært § 21, stk. 3 og uppskotna revsiramman í § 237, stk. 7.

Í mun til galdandi rætt er ásetingin um kontaktforboð nýggj.

Undantikið frá forboðnum í stk. 1, er kontakt, tilhald ella ferðing, sum tann dømdi av serligum orsøkum má metast at hava rætt til. Hervið verður lógarfest, at tað kann verða føri, har atburð, sum formliga kann vera brot á eitt forboð í stk. 1 av serligum orsøkum, ikki má metast sum brot á ásetingin í stk.1. Talan er um eitt rættiliga smalt undantak.

Viðvíkjandi tilhaldsforboð er dømi um serlig orsøk, at dømdi stutt ferðast ígjøgnum øki, har viðkomandi hevur forboð at vera, í samband við luttøka í rørslurenning við fastløgd farleið. Tað kundi eisini verið í samband við bráfeingis læknavitjan, bráfeingis vitjan á skaðastovu ella

apotek, um tað vildi føra við sær munandi longri flutningstíð ikki at fara ígjøgnum øki, sum var fevnt av tilhaldsforboðið

Viðvíkjandi bústaðarforboð er næstan einasta dømi um serlig orsøk, har dømdi má metast at hava rætt til formiliga at bróta ásetingin, tey føri har tann dømdi og eitt barn fleiri dagar í senn eru noydd at liggja nátt á sama bústaði, vegna til dømis heilt serliga vánaligt veður, sum ger at ikki ber til at fara frá bústaðin, sum ætla.

Viðvíkjandi vitjanarforboð kann hugsast dømi, har tann vaksni sum er við barnið, bráfeingis noyðist at lata barnið vera hjá tí dømda. Tað kann vera vegna knappilig álvarslig sjúka ella løst hjá viðkomandi ella løst hjá øðrum, til dømis eitt barn hjá viðkomandi ella tí viðkomandi knappiliga fær bráfeingis boð um at komma til arbeiðis tí ein neyðstøða er íkomin. Í tílíkum førum má leggjast til grund, at rímiligar royndir vera gjørdar fyri at lata barnið yvir til onkran annan enn tann dømdi. Annað dømi kann vera, at orsøkin til at barnið kemur á vitjan er, at tað er løsta, ella er vilst ella líknandi. Eisini í hesum førunum má leggjast til grund, at rímililigar royndir vera gjørdar fyri at fáa hjálp frá øðrum.

Viðvíkjandi kontaktforboð, vil tað neyvan koma fyri, at tað finst serligar orsøkir til at bróta forboðið. Hetta skuldi í so fall verið føri, har dømdi var í eini neyðstøðu og bert hevði møguleika fyri at samskifta gjøgnum internetið. Hóast dømi kunnu vera um hetta, til dømis tí viðkomandi av óvart er læst inni, so er sannlíkindini fyri, at hetta skal henda einum persóni, sum er dømdur kontaktforboð, sera lítil.

Bústaðarforboð og vitjanarforboð er ikki galdandi fyri børn ella ættleitt børn hjá dømda. Hetta svarar sum heild við galdandi áseting.

**Til nr. 7**
Av tí at nýggj lóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing verður sett í gildið, verður § 265 strika. Heimildin fyri at geva tilhald, verður sostatt flutt í aðra lóg, og samstundis víðkað til eisini at fevna um uppihaldsforboð og burturvising. Samstundis verða treytirnar nágreinaðar fyri nær tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing kann nýtast.

**Til nr. 8**
Hendan broytingin er ein avleiðing av at § 265 verður strikað.

**Til § 2**
Gildiskoma

Løgmansskrivstovan, dagfesting.

**Axel W. Johannesen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: